# Betri miðlar

**-**

# álit um føroyskar miðlar

## Samandráttur

Fyrsti spurningurin, ið skal svarast, tá hugt verður eftir føroyskum miðlum, er: hvat skulu føroyskir miðlar vera? Hvønn miðlaheim skulu vit hava á føroyskum máli? Og hvønn leiklut ynskja vit, at miðlarnir hava í føroyska samfelagnum? Tað eru ómetaliga nógvir vegir at fara, tá karmarnir hjá miðlunum skulu ásetast.

Kringvarp Føroya er grundfestur partur av føroyskari mentan og ein av størstu miðlastovnum í landinum. Stórur partur av føroyingum antin lurtar eftir, hyggur at ella lesur dagliga ymisk miðlatilboð á pallunum hjá Kringvarpi Føroya. Og Kringvarpið hevur stóran týdning fyri borgararnar og samfelagið, hóast atfinningar eru ímóti góðskuni og innihaldinum – serliga viðvíkjandi sjónvarpinum. Samstundis hevur Kringvarpið eisini týdning fyri hinar miðlarnar. Í verandi støðu hevur stovnurin ikki bara góða ávirkan á samlaða miðlalandslagið – stovnurin darvar eisini kappingarførið hjá hinum miðlunum, tí Kringvarp Føroya vinnur pening við lýsingavirksemi, samstundis sum borgarunum er álagt at rinda kringvarpsgjald. Henda støðan krevur politiska viðgerð, tí politiska skipanin er myndugleikin, ið hevur størstu ávirkanina á, hvussu føroysku miðlarnir síggja út í framtíðini.

Kringvarpi Føroya tørvar eisini politiska viðgerð. Avgerð má takast um, hvat vit vilja við Kringvarpi Føroya. Verður tann spurningurin svaraður, ber til at svara øðrum spurningum so sum, hvørjar raðfestingar stovnurin skal gera, hvat vav tænasturnar skulu hava, og hvørjum støði innihaldið skal miða ímóti. Kringvarp Føroya er við til at røkja og menna almenna rúmið og gevur føroyingum møguleika at móttaka óhefta kunning um øll samfelagslig viðurskifti. Spurningurin er, hvussu uppgávan skal fremjast í framtíðini.

Føroyska málið er lítið og er í beinharðari kapping við eitt risastórt útlendskt miðlaútboð á serliga netinum og í sjónvarpinum. Fyri at varðveita og styrkja føroyskt mál og mentan er avgerandi, at miðlarnir hava hóskandi fíggjarlig kor, og at arbeiðsumstøðurnar í miðlunum eru góðar.

Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum er greið: broytingar skulu fremjast í yvirskipaðu viðurskiftunum hjá føroysku miðlunum. Endamálið við tilmælinum er at geva føroyingum betri miðlar í framtíðini. Arbeiðsbólkurin mælir til, at kringvarpsgjaldið verður lagt inn í skattaskipanina sum fast gjald, og at gjaldið verður prístalsviðgjørt. Hetta gevur Kringvarpinum betri fíggjarligt støðufesti. Lýsingainntøkurnar hjá Kringvarpinum eru kappingaravlagandi. Umráðandi er, at privatu miðlunum eisini verður lív lagað. Ásannandi serstøðu Kringvarpsins á sjónvarpsøkinum og avmarkaðu kappingina á útvarpsøkinum mælir arbeiðsbólkurin til, at Kringvarpið varðveitir rættin at varpa lýsingar, men at inntøkurnar av hesum fara í ein *miðlagrunn*, ið skal stuðla føroysku miðlunum. Á henda hátt varðveitir Kringvarpið lýsingapallin, og samstundis fáa privatu miðlarnir meira pening um hendur.

Sjónvarpið er enn ein stórur miðil, ið fólk nýta nógva tíð frammanfyri. Arbeiðsbólkurin mælir til, at allir føroyingar fáa møguleikan at síggja sjónvarpsrásina hjá Kringvarpinum talgilda. Kappingin frá útlendskum rásum er - og verður framhaldandi - stór. Tá allir føroyingar síggja sjónvarpsrásina hjá Kringvarpinum talgilda, er mest sannlíkt, at sendingarnar verða føroyskar burturav, og útlendsku sendingarnar verða tekst- ella ljóðviðgjørdar. Henda støðan kann yvir eitt longri áramál broyta sjónvarpsframleiðsluna í Føroyum og geva føroyingum betri føroyskt sjónvarp.

Endamálið við at føra fjølmiðlapolitikk er fyrst og fremst at geva borgarunum og samfelagnum gott og álítandi miðlainnihald. Størri útboðið av miðlum er, størri verður margfeldið. Samstundis skulu miðlarnir virka og halda ásetingar um góðan fjølmiðlasið. Hesi viðurskifti verða viðgjørd í álitinum *Betri miðlar – álit um føroyskar miðlar.*

# Innihaldsyvirlit

1 Inngangur ... 5
1.1 Arbeiðssetningurin ... 7
1.2 Háttalag ... 7
1.3 Hví álit um føroyskar miðlar? ... 8
2 Public service ... 11
2.1 Public service í Føroyum ... 14
2.1.1 Føroysk public service-loysn ... 16
2.1.2 Broytt tíðindamentan ... 21
2.1.3 Avbjóðingar hjá public service í framtíðini ... 22
2.2 Framleiðslan í Kringvarpinum ... 23
2.3 Talgilt sjónvarpssendinet ... 26
3 Fíggjarlig viðurskifti í Kringvarpinum ... 28
3.1 Núverandi fígging av Kringvarpinum ... 29
3.1.1 Kringvarpsgjaldið ... 31
3.1.2 Søguliga gongdin ... 32
3.1.3 Lýsingainntøkur í Kringvarpinum ... 34
3.2 Kringvarpsgjaldið yvir skattin ... 35
3.3 Gjald umvegis skattaskipanina ... 37
3.3.1 Fast gjald ... 37
3.3.2 Fastur prosentpartur av inntøkuni ... 38
3.4 MVG frítøka ... 39
3.5 Kringvarpið sum alment partafelag ... 40
3.5.1 Partafeløg ... 40
3.5.2 Almenn partafeløg ... 41
3.5.3 Noreg, Svøríki og Ísland ... 42
3.5.4 Kringvarpsmyndilin ... 44
3.5.5 Sjálvsognarstovnur ... 47
3.6 Um støðan ikki broytist ... 47
4 Privatir miðlar í Føroyum ... 50
4.1 Privata miðlaskipanin í Føroyum ... 50
4.1.1 Bløð ... 51
4.1.2 Útvarpsstøðir ... 52
4.1.3 Portalar ... 53
4.1.4 Sjónvarp ... 54
4.2 Útberingarstuðul ... 55
5 Miðlagrunnur ... 57
6 Føroyskir miðlar í framtíðini ... 63
7 Tilmæli frá arbeiðsbólkinum ... 66
8 Útgangur ... 71
9 Yvirlit yvir hoyringarpartar ... 73
Keldur ... 74

# 1 Inngangur

Í februar í ár setti Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, eina fjølmiðlakommissjón at viðgera og svara nøkrum spurningum, at skriva eitt álit og at seta fram uppskot um, hvussu víðari skal farast fram, tá ið tað snýr seg um føroyskan miðlapolitikk. Álitið skal síðan leggjast fyri politiska myndugleikan til nærri viðgerðar.

Um arbeiðssetning, háttalag og um, hví tað er átrokandi við einum áliti um føroyskar miðlar, verður nærri lýst í fyrsta kapitli.

Eitt er, at føroyskt miðlaøkið er heilt ungt í mun til miðlarnar í grannalondunum, eitt annað er, at tað higartil hvørki er skrivað ella granskað nakað serligt í føroyskum miðlum. Tað er sostatt avmarkað, hvat arbeiðsbólkurin hevur havt atgongd til av skrivligum tilfari, tí er tað serliga áhugavert, at bólkurin undir arbeiðinum hevur staðfest, at Fróðskaparsetur Føroya nú av álvara er farið undir at fyrireika at bjóða út miðlafrøðiútbúgving, tí slík útbúgving kann eisini slóða fyri, at miðlaspurningurin í síni heild verður nógv meira viðgjørdur í framtíðini. M.a. av hesi orsøk hava teir hoyringarfundir, kommissjónin hevur havt við avvarðandi fyritøkur, stovnar og feløg, ið onkursvegna varða av ella arbeiða við fjølmiðlapolitikkinum, verið gull verdir. Øllum hesum fólkunum siga vit øll hjartans tøkk.

Við høvuðsdenti á:

- Løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp,
- Public service-sáttmálan 2011-2013 millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið, og ikki minst við støði í
- praksis í føroyska miðlaheiminum í dag

er í álitinum gjørd ein roynd at lýsa støðuna og at koma við tilmælum um loysnir, sum kunnu vera grundarlag undir eini nýggjari realistiskari miðlasemju.

Á ólavsøku 2011

| | |
|---|---|
| Martin Næs, deildarstjóri, formaður | Høgni Reistrup, cand.mag., skrivari |
| Katrin D. Apol, cand mag. | Enna Garðshorn Mikkelsen, cand.mag., journalistur |
| Sigmund Poulsen, advokatur | Ina Hyttel Hammershaimb, cand. oecon. |
| Alda Joensen, fulltrúi, samskipari | |

## 1.1 Arbeiðssetningurin

Arbeiðssetningurin, sum er grundarlagið undir arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum, er soljóðandi:

- Skal kringvarpsbygnaðurin vera, sum hann er, ella eru aðrir møguleikar, sum betri stuðla upp undir Kringvarpið sum mentanarbera og public service-stovn. Skal Kringvarpið t.d. umskipast til eitt alment partafelag e.l.?

- Hvussu kann Kringvarpið fíggjast í framtíðini, samstundis sum vit á bestan hátt tryggja, at eitt úrval av privatum fjølmiðlum (bløð, portalar og sendistøðir) kunnu virka og halda ásetingar um góðan fjølmiðlasið?

- Eru tað viðurskifti í Føroyum samanborið við onnur Norðurlond, ið gera tað neyðugt og skilagott at velja annan leist at veita Føroya fólki neyðugar public service-tænastur enn tann, sum er ásettur í kringvarpslógini og í public service-sáttmálanum?

## 1.2 Háttalag

Arbeiðsbólkurin hevur í sínum arbeiði lagt stóran dent á at hoyra viðkomandi partar í føroysku miðlunum. Bólkurin hevur í allari tilgongdini innkallað leiðarar og starvsfólk í miðlunum og fólk við ávirkan á og áhuga fyri føroyskum miðlum og lurtað eftir teirra sjónarmiðum. Álitið byggir sostatt eisini á boðskapir, lýsingar og tilfar, sum er komið fram undir hoyringunum. Á henda hátt er ljós varpað á fyrimunir og vansar við verandi miðlaskipan, og bólkurin hevur fingið betri innlit í, hvørjar tillagingar kunnu fremjast, soleiðis at føroyingar í framtíðini fáa so stórt, fjøltáttað og gott úrval av føroyskum miðlatilfari sum gjørligt.

Arbeiðsbólkurin hevur í sambandi við viðgerðina av kringvarpsbygnaðinum ikki viðgjørt innanhýsis bygnaðinum á stovninum – eitt nú hvussu nógvar deildir stovnurin skal hava, og um stovnurin í dag nýtir peningin nóg væl. Hetta er ikki partur av yvirskipaða spurninginum um bygnaðin, ið bólkurin viðgerð. Tó metir bólkurin, at

hesin spurningur er týdningarmikil og eigur at viðgerðast. Álitið leggur hinvegin dent á spurningin um, hvussu Kringvarpið yvirskipað skal skipast. Bólkurin metir, at stjórin og starvsfólkini í Kringvarpinum og kringvarpsstýrið skulu viðgera hetta økið. Álitið hyggur hinvegin nærri at spurningum um, hvussu Kringvarpið skal skipast. Kringvarpið er í dag ein sjálvstøðugur almennur stovnur, men Kringvarpið kann eitt nú skipast sum alment partafelag. Hetta verður viðgjørt í 3.5. Innanhýsis bygnaðurin er umráðandi og fyllir nógv í gerandisdegnum hjá starvsfólkunum í Kringvarpinum. Hetta er eisini komið fram undir hoyringunum. Vísandi til talið á deildum í Kringvarpinum segði ein limur í Føroyskum Miðlafólkum millum annað undir eini hoyring, at "Kringvarpið er jú ikki BBC". At umstøðurnar skulu tillagast viðurskiftunum í einstøku londunum, er í tráð við nýggjastu granskingina innan public service-miðlar (Lowe & Nissen: 2011), og tí má støðugt hyggjast eftir, hvussu innanhýsis bygnaðurin í Kringvarpinum er skipaður.

## *1.3 Hví álit um føroyskar miðlar?*

Í mentanarliga og málsliga smáum økjum eru miðlarnir eitt týdningarmikið amboð at byggja samleika og staðfesta fólkaræðislig rættindi. Miðlarnir eru ikki einans umráðandi fyri einstaka borgaran. Miðlarnir hava eisini ein meira umfatandi og víðfevndan týdning og ávirkan á gerandisdagin, politikk, búskap og samfelagið í síni heild. Fólkaræðið er eisini neyvt tengt at, hvussu miðlaskipanin í einum landi er sett saman. Fólkaræðið í sær sjálvum er ómetaliga fjølbroytt, og tí hevur tað eisini týdning, at teir miðlar, ið samfelagið stuðlar, eru fjølbroyttir í formi og innihaldi. Við einum fjølbroyttum miðlaúrvali verður leikvøllurin fyri sjálvstøðugari hugsan víðkaður umframt, at borgararnir støðugt læra at nýta kritiskan hugsanarhátt. Fjølbroytt eigaraviðurskifti tryggja eisini, at fleiri røddir koma framat og verða hoyrdar (Baker: 2007; Dwyer: 2010). Tí snýr miðlapolitikkur seg um, hvussu grundleggjandi rættindi sum kunningar- og talufrælsi kunnu varðveitast og mennast. Hesi rættindi eru nær tengd at, hvussu fríir og fjølbroyttir miðlarnir í einum samfelagi eru. Givið er, at miðlarnir kunnu vera við at styrkja evnini hjá borgarunum at virka í samfelagnum, og at miðlarnir tryggja føroyingum upplýsingar um fólkaræðisliga orðaskiftið. Yvirskipað ber til at siga, at fólk eru samd um málið – at miðlarnir skulu

vera við til at styrkja almenna orðaskiftið og fólkaræðið. Hinvegin eru fleiri meiningar um, hvussu hetta verður framt í verki.

Í hesum áliti verður hugt eftir støðuni hjá føroyskum miðlum í dag, og hvussu føroyingar í framtíðini kunnu tryggjast eitt breitt og fjøltáttað útboð av miðlum. Miðlarnir broytast støðugt, og hetta er ein av orsøkunum til, at stundin er komin at hyggja nærri at framtíðini hjá føroyskum miðlum. Hvat, nær og hvussu føroyingar hyggja, lurta og lesa broytist í heilum. Áhaldandi broytingin í miðlalandslagnum kemst fyrst og fremst av eini skjótari tøkniligari menning. Og ferðin er skjótari enn nakrantíð áður. Síðani Útvarp Føroya var sett á stovn í 1957, og Sjónvarp Føroya sendi fyrstu ferð í 1984 er farin fram ein kollvelting á kunningar- og samskiftisøkinum. Við fylgisveinasjónvarpi og talgildari útgerð sær meginparturin av føroyingum hópin av sjónvarpsrásum úr øllum heiminum. Skjóti vøksturin av alnetinum og fjarskiftinum hevur broytt – og broytir framhaldandi - miðlamynstrið hjá føroyingum. Harafturat finna miðlar saman og skapa nýggjar fortreytir.

Sambandið millum allar partar av heiminum hevur ongantíð verið betri, og hetta hevur givið brúkarunum nýggjar møguleikar, sum eisini hava broytt miðlavanar. Føroyingurin á Oyrasundskollegiinum í Keypmannahavn kann í dag fylgja við, tá løgtingsval er beinleiðis í sjónvarpinum, og sjómaðurin á Norðhavinum kann lesa tíðindi á portalum og samstundis lurta eftir føroyskum útvarpi. Eitt sterkt føroyskt miðlatilboð kann tískil eisini røkka teimum fleiri túsund, sum vanliga hava verið meira avskorin frá at fylgja við í og eisini luttaka í almenna orðaskiftinum í Føroyum orsakað av, at tey eru burturi í útbúgvingar- og arbeiðsørindum, ella tí tey hava valt at búsetast í øðrum londum.

Altjóðagerðin av miðlunum hevur við sær nógvar fyrimunir. Hon styrkir millum annað luttøkuna hjá borgarunum í einum altjóðagjørdum heimi. Men hetta gevur eisini føroyskum miðlum stórar avbjóðingar. Kappingin um tíðina hjá lesarum, hyggjarum og lurtarum er nógv vaksin, og broytingin merkir, at miðlainnihaldið virkar eftir einum alsamt vaksandi handilsligum logikki. Útlendskar miðlafyritøkur stýra hesum logikki, og tí eru føroyskir miðlar ikki bara í kapping sínámillum og innanlands, teir

eru eisini í stórari kapping við útlendsku miðlarnar – bæði við teir privatu handilsligu og viðaðrar public service miðlar. Einans eitt gott føroyskt miðlaútboð kann kappast við nógva útlendska tilfarið. Og hetta krevur pening. Í álitinum verða fíggjarligu viðurskiftini serliga hjá Kringvarpi Føroya nærri viðgjørd.

Er tørvur á einum føroyskum public service-tilboði í einum heimi við alsamt fleiri útlendskum sjónvarpsrásum og stórum úrvali av innihaldi á netinum?

Hvussu skapa vit eitt felags útgangsstøði, og hvussu gera vit gott innihald við støði í føroyskari mentan og virðum, ið styrkja samfestið í samfelagnum? Kann miðlamarknaðurin einsamallur lyfta uppgávuna at miðla føroyingum nøktandi tilfar? Er tað public service, at fólkið hevur møguleika at hoyra og síggja lýsingar?
Og hvussu skulu vit bjóða føroyingum public service í framtíðini? Hetta eru spurningar, sum eru átrokandi, og sum hetta álit roynir at greina og svara.

Uttan mun til hvussu føroysku miðlarnir verða fíggjaðir í framtíðini, er avgerandi, at samlaða miðlaútboðið er fjølbroytt, og at miðlarnir miðla eitt sterkt og samfelagsliga gagnligt innihald til allar føroyingar. Fleiri røddir, fleiri hugskot og fleiri sjónarhorn skulu miðlast, tí tað gevur eitt fjølbroyttari útboð. Harafturat er umráðandi, at innihaldið er við til at stimbra og stuðla einum fríum orðaskifti um mentanarlig og samfelagslig viðurskifti og fólkaræði í síni heild.

Fíggingin av Kringvarpi Føroya og av privatu miðlunum í Føroyum snýr seg um meira enn tøl og, um hvussu nógv vit vilja gjalda ella skerja. Yvirkipað snýr tað seg um, hvat slag av miðlaheimi vit ynskja í Føroyum í framtíðini.

Ein vælvirkandi miðlaheimur er við til at tryggja eitt opið samfelag. Men tað er ikki bara *eitt* svar upp á spurningin, hvussu vit fáa vælvirkandi miðlar. Tí er uppgávan eisini at hyggja eftir, hvussu miðlarnir í framtíðini kunnu vera við til at menna almenna rúmið við at leggja dent á pluralismu og margfeldi.

## 2 Public service

Hóast álitið ikki er avmarkað til bara at viðgera Kringvarpið, so spæla public service-hugtakið og Kringvarpið stóran leiklut í arbeiðssetnin ginum. Kringvarpið er ein av størstu mentanarstovnunum í landinum og størsti framleiðari av tíðindum og øðrum journalistiskum tilfari. Harafturat hevur verandi fígging av Kringvarpinum ávirkan á, hvussu hinir føroysku miðlarnir virka. Føroya Blaðútgevarafelag og umboð fyri privatar loftbornar miðlar hava víst á, at lýsingainntøkurnar hjá Kringvarpinum avmarka inntøkumøguleikarnar hjá miðlunum, ið virka á handilsligum grundarlagi.

Útvarps- og sjónvarpsmiðlarnir byrjaðu í Evropa sum almennir public service-stovnar av tøkniligum ávum. Sendimøguleikarnir vóru avmarkaðir, og tí stovnaðu tjóðir, serliga í Vesturevropa, public service-støðir. Tøknilig frambrot hava síðani skapt aðrar grundir til at varðveita public service-stovnar. Í dag er leikluturin sum mentanarberi og umboð fyri fólkaræðisliga hugsan avgerandi fyri, at public service-stovnar eru til í nógvum londum.

Við einum public service-stovni verður miðað ímóti, at borgarunum stendur dygdargott miðlatilfar á egnum máli í boði. Kringvarpið sum mentanarstovnur bjóðar fram eitt slag av felags torgi, har fólkið fær felags vitan og upplivingar. Innihaldið skal bæði skapa áhuga fyri luttøku og eggja fólki til at taka lut í samfelagsliga orðaskiftinum. Á mentanarliga økinum skal public service-stovnurin bæði spegla og skapa mentan. Harafturat er eitt av aðalmálunum við public service-miðlum at veita borgarunum góðan, álítandi og óheftan tíðindaflutning fyri at styrkja tilvitanina og møguleikan hjá einstaka borgaranum at virka í samfelagnum. Óheftni og trúvirði eru lyklaorð í public service-hugtakinum. Her verður serliga hugsað um, at ein public service-stovnur skal vera óheftur av handilsligum og flokspolitiskum áhugamálum, sum kunnu ávirka tíðindaflutningin, og at stovnurin heldur fjarstøðu til politisku skipanina – tó at hon tryggjar, at stovnurin er til og formar yvirskipaðu karmarnar. Leikluturin sum *watchdog* vis-à-vis lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið er eisini umráðandi.

Bæði privatir miðlar, Kringvarpið og kringvarpsstýrið meta, at verandi kringvarpsgjald tryggjar stórt óheftni frá politisku skipanini. Sambært grein 5 í kringvarpslógini er Kringvarpsstýrið ovasta leiðslan á Kringvarpsstovninum og hevur yvirskipaðu ábyrgdina av virkseminum hjá stovninum. Stýrið hevur dagliga eftirlitið við stovninum og hevur ábyrgdina av, at stovnurin fylgir lógini. Kringvarpsstýrið tryggjar tískil, at politikarar ikki hava beinleiðis ávirkan á innihaldið í Kringvarpinum. Hinvegin má staðfestast, at lýsingainntøkurnar hjá Kringvarpinum kunnu hava ávirkan á óheftnið. Hóast trupult er at finna dømi um samanfall millum vantandi kritiska umrøðu av eini fyritøku ella stovni í Kringvarpinum orsakað av, at viðkomandi fyritøka ella stovnur hevur lýst í Kringvarpinum, so eru fleiri privatir miðlar, ið ikki meta Kringvarpið vera óheft orsakað av verandi lýsingainntøkum hjá stovninum.

Hyggja vit eftir støðuni í eitt nú Italia, so eigur statsleiðarin meginpartin av miðlunum, og harvið stýrir hann teimum eisini. Tað er eingin sjálvfylgja, at miðlarnir eru fríir. Frælsir miðlar eru ein hornasteinur í framkomnum fólkaræðum, og eitt vælvirkandi Kringvarp kann arbeiða fyri at varðveita og ríka almenna rúmið, sum eitt nútímans fólkaræðisligt samfelag byggir á. Kringvarpið skal tí skapa og stimbra eitt álítandi alment rúm til orðaskifti og mentanarligt virksemi. Somuleiðis skal stovnurin eggja til luttøku, vitan og forvitni hjá føroyingum. Borgarin skal í meginregluni ogna sær nýggja vitan, hvørja ferð tendrað verður fyri eini tænastu hjá Kringvarpinum.

Hóast breið politisk semja er í nógvum londum um, at ein public service-stovnur hevur sítt sjálvsagda pláss í miðlaskipanini, so verður støðugt hugt at public service-hugtakinum, og hvussu yvirskipaðu karmarnir hjá miðlunum verða lagdir til rættis. Við útgangsstøði í borgarunum verða spurningar settir við, hvussu public service-miðlarnir kunnu stimbra eina fólkaræðisliga menning, almenna rúmið, miðlapluralismu og mentanarligt margfeldi. Public service-miðlarnir verða áhaldandi trýstir av áhugabólkum, ið ynskja ein miðlamarknað uttan public service-miðlar. Hetta kemst millum annað av, at tøknin ikki longur avmarkar sendimøguleikarnar í ymisku londunum. Hetta hevur eisini broytt tilgongdina til public service. Besta dømi um hetta er, at størri dentur í dag verður lagdur á *fólkaræðisliga týdningin* av public service-miðlum.

Ein høvuðsorsøk til, at public service-miðlar eru í flestu vesturlendskum londum, er, at marknaðurin einsamallur ikki megnar at bjóða borgarunum nøktandi tilfar. Handilsligir miðlar royna fyrst og fremst at økja um talið á brúkarum. Sjónvarpsstøðir síggja eitt nú varpanina av innihaldi sum eina vøru, sum skal seljast til so høgan prís sum gjørligt og ikki sum ein sosialan ágóða, sum er við til at skilmarka sosiala og politiska bygnaðin í samfelagnum. Hetta merkir, at góðtaka vit public service, góðtaka vit samstundis, at samfelagið verður skapt av meira enn marknaðarkreftum. Privatu miðlarnir hava stóran týdning fyri samfelagið, men public service-miðilin hevur ein serligan leiklut, ið millum annað merkir, at stovnurin skal savna fólkið og ikki bara nøkta tørvin hjá borgarunum hvør sær. Tískil kann public service-miðilin vera við til at nøkta ein yvirskipaðan tørv í samfelagnum, sum privatir miðlar hinvegin ikki hava skyldu at veita.

Kringvarpið metir sjálvt, at fólkaræðisligi leikluturin er avgerandi, og at Kringvarpið sum ein sjálvstøðugur almennur stovnur kann standa ímóti nógva tilfarinum, sum ikki er óheft. Privatir miðlar hava stóran týdning fyri samlaðu miðlaskipanina, men uttan ein óheftan stovn, sum ikki einans framleiðir tilfar á handilsligum grundarlagi, men eisini ger tilfar til minnilutar og smáar bólkar í samfelagnum, verður fjølbroytnið í miðlunum skert munandi. Kringvarpið hevur, sum nú er, skyldu at vera okkurt fyri øll. Var eingin public service-miðil í Føroyum, var útboðið av tilfari avmarkað til ávísar bólkar í samfelagnum. Eftirspurningurin á marknaðinum er ikki altíð tað, ið sæð frá einum samfelagsligum sjónarhorni er gagnligt fyri samfelagið. Áhugamálini hjá samfelagnum og einstaka borgaranum kunnu ikki altíð sameinast. Hetta er eisini ein av orsøkunum til, at Kringvarpið ynskir at geva fólkið kunning um hendingar og viðurskifti, sum tey ikki vistu, at teimum tørvaðu. Logikkurin í handilsligum miðlum tekur framum eina einstáttan av smakki og nýtslumynstri. Hetta kemst í høvuðsheitum av, at ein einsháttað fjøld er kostnaðargóð loysn fyri lýsarar. Hinvegin hevur Kringvarpið - sum almennur miðil - skyldu at gera viðkomandi tilfar til allar bólkar í samfelagnum, tí øll rinda fyri tænasturnar hjá stovninum.

Tosað hevur verið um, hví ein ávísur stovnur skal fáa allan peningin fyri kringvarpsgjaldið. Og skotið hevur verið upp at býta peningin til fleiri miðlar. Henda loysnin er longu roynd í New Zealandi í 1990´unum. Tá bleiv public service-miðilin í landinum útvatnaður og misti tann serliga týdningin, ið ein public service-stovnur hevur. Í 2003 royndu politikararnir at endurstovna gomlu skipanina, men tað hilnaðist ikki væl (Lund, Nord, Roppen: 2009). Tískil er nógv, sum bendir á, at verður eina ferð farið burtur frá siðbundnu public service-skipanini, er trupult at venda aftur.

Tá grundgivið verður fyri public service, verður ofta víst til lond uttan sterkar public service-stovnar. Kanningar (Curran: 2009) vísa eisini, at hóast summir borgarar ikki hava stórvegis áhuga í samfelagsligum viðurskiftum, so hava borgarar í londum, har tíðindi verða send á public service-rásum, størri almenna vitan og kunnleika til samfelagslig viðurskifti innanlands og uttanlands samanborið við fólk í londum uttan sterkar public service-miðlar. Góð og óheft tíðindi eru dýr at framleiða, men hesin leiklutur er álagdur Kringvarpinum. Hetta kann tískil millum annað stuðla upp undir, at avgerðir verða tiknar út frá einum felags upplýsandi grundarlagi.

Staðfestast kann, at ein public service-stovnur skal eggja til luttøku í fólkaræðisliga orðaskiftinum og tað, at varðveita og styrkja mál og mentan, hevur verið eitt av aðalmálunum hjá public service-stovnum í vesturheiminum og ein av høvuðsorsøkunum til, at stovnarnir hava havt breiða politiska undirtøku í flestu londum. Til ber at siga, at public service-stovnurin skal viðlíkahalda og menna orðaskiftið í samfelagnum um samfelagið.

## 2.1 Public service í Føroyum

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Kringvarpi Føroya er, at fólkagrundarlagið er nógv minni samanborið við onnur lond við public service-stovnum. Færri fólk eru at gjalda kostnaðin fyri public service-tænasturnar. Kringvarpsgjaldið er í løtuni 3.625 kr. árliga fyri hvørt húskið. Hetta er hægsta kringvarpsgjald í vesturheiminum. Hóast gjaldið er lutfalsliga høgt, so røkkur tað kortini ikki til at framleiða tilfar til eina fullfíggjaða

føroyska sjónvarpsrás. Útvarpið hevur hinvegin megnað bæði at bygt upp eina sendiskrá við sendingum, ið savna nógvar lurtarar, og við smølum sendingum, ið hava fáar lurtarar. Útvarpið hevur eisini roynt at vera okkurt fyri øll og umboðað allar Føroyar við framleidda tilfarinum. Sjálvsfatanin í Kringvarpinum er eisini, at stovnurin hevur stóran samfelagsligan týdning. Kringvarpið nevnir savnið sum dømi. Stovnurin heystar í dag samrøðurnar, ið vórðu gjørdar fyri 50 árum síðani. Samrøðurnar vórðu gjørdar, tí Kringvarpið var til í 60´unum, og tí kann stovnurin í dag sum einasti miðilin bera søguligu samrøðurnar víðari til lurtararnar. Samrøðurnar geva fólki innlit í endurminningar, ið røkka heilt aftur til tilburðir og hendingar í 1880'unum.

Kringvarpið tekur eisini gudstænastur upp hvønn sunnudag – bæði til útvarp og sjónvarp. Í 2010 kostaði henda uppgávan 545.000 kr. Hetta verður gjørt, tí tað verður mett at hava góða samfelagsliga ávirkan, hóast lurtara- og hyggjaratølini til sendingarnar ikki eru stór. Kringvarp Føroya skal eisini, sambært public service-sáttmálanum, gera tilfar, sum ikki varð gjørt, um Kringvarpið ikki sendi tað. Hesa uppgávu hevur stovnurin í nógvum førum tikið á seg og í øðrum førum ikki gjørt so nógv við. Eitt nú hevur Kringvarpið ikki framleitt nógv tilfar til ung.

Serliga Útvarpið hevur havt stóran týdning fyri føroyska málið. Mátin, miðlarnir nýta málið, er við til at forma málið. Vísast kann til røðu, ið J.H.W Poulsen professari, helt í sambandi við útgávuna av bókini "Orðabókin". Í hesari tilgongd hevur public service-hugtakið verið við til at styrkja føroyska málið, tí í lóggávuni hevur ítøkiliga verið nevnt, at Útvarpið skal menna málið og nýta góðan málburð. Málpolitikkurin í útvarpinum hevur frá fyrsta degi verið tann, at málið í útvarpinum er føroyskt. Í lógini um kringvarp frá 2006 stendur millum annað, at "*Kringvarp Føroya eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum*" umframt, at stovnurin skal leggja dent á at varðveita og fjálga um málið.

Lítla støddin á føroyska samfelagnum hevur stóran týdning fyri, hvussu nógvur peningur kemur inn til framleiðslu av miðlatilfari. At senda ein tíma av føroyskum tíðindatilfari kostar í meginregluni tað sama sum at senda ein tíma av tilfari í Bretlandi ella í Svøríki. Hetta er ein av orsøkunum til, at sjónvarpið hjá Kringvarpinum

ongantíð hevur megnað at verið føroyskt burturav. Hóast sendikostnaðurin er hin sami í ymiskum londum, er framleiðslukostnaðurin ofta tillagaður viðurskiftunum í einstøku londunum. Harumframt er slagið av sendingum skipað á ein hátt, so tað hóskar til støddina á samfelagnum og til inntøkugrundarlagið. Hetta er eisini galdandi á public service-økinum. Tískil er eisini stórur munur á kostnaðinum fyri 20 minuttir av føroyskum og t.d. týskum útvarpstíðindum. Viðurskifti, ið umfata støddina á einum samfelagi, nøgd og góðsku av miðlatilfari, verða viðgjørd í 2.1.1.

Lítla nøgdin av føroyskum sjónvarpi er ein av høvuðsorsøkunum til, at ónøgd er við sjónvarpið hjá Kringvarpinum. Sum dømi kann nevnast, at 58% av fólkinum í bretlandi halda, at tey fáa *"good value for money"* við bretska public service-kringvarpinum, BBC, og 74% av norðmonnum halda tað sama um NRK. Í Føroyum eru eingi hagtøl, ið vísa nøgdsemið hjá føroyingum við Kringvarpið. Umframt at rinda munandi minni í kringvarpsgjaldi, fáa bretar og norðmenn fleirfaldað tað tilfar, ið føroyingar fáa, hóast vit rinda hægri kringvarpsgjald. Prísurin fyri gott loftmiðlainnihald er høgur. Her hava stór lond og stórar miðlafyritøkur fyrimunir. Meinbogin í Føroyum er, at

- Vit eru fá
- Eginframleiðslan er dýrari enn útlendskt tilfar
- Færri møguleikar eru at nýta tilfarið umaftur
- Verri er at selja sendingar til onnur lond

### 2.1.1 Føroysk public service-loysn

Hóast public service-stovnarnir í ymisku londunum hava felags eyðkenni, so hava stovnarnir ongantíð verið meinlíkir. Public service-bygnaðurin er altíð tengdur at búskaparligum, politiskum, sosialum og mentanarligum viðurskiftum í einstøku londunum. Samanhangirnir eru ymiskir frá landi til land, og tí eru public service-stovnarnir eisini settir saman á ymiskan hátt. Til ber at hyggja at, hvussu public service-bygnaðurin er í øðrum londum. Samstundis er umráðandi at finna egnan leist á public service-økinum. Í hesum sambandi er serliga støddin á føroyska

samfelagnum avgerandi fyri, hvussu ein føroyskur public service-stovnur verður fíggjaður, so at eitt skilagott býti verður millum mentanarpolitisk atlit og atlit at kapping á miðlamarknaðinum. Umráðandi er bæði at hyggja at almenna orðaskiftinum, leiklutinum hjá øðrum miðlum og fíggjarligu orkuni hjá borgarunum.

Fyrsta treytin fyri at viðgera framtíðar fíggingina og bygnaðin av einum public service-stovni er at taka støðu til, hvørjar ætlanir eru við stovninum. Tí er umráðandi at taka støðu til, hvør leikluturin hjá Kringvarpinum skal vera í Føroyum, og hvørjum endamáli stovnurin tænir. Her hevur lóggevandi valdið avgerandi týdning, tí hesin myndugleiki hevur størstu ávirkan á, hvørjar ætlanir eru við Kringvarpinum. Samfelagið fíggjar Kringvarpið, og tí er tað eisini natúrligt, at krøv fylgja við. Í hesum sambandi er public service-sáttmálin, sum á fyrsta sinni var undirskrivaður millum Mentamálaráðið og Kringvarpið í 2010, eitt gott amboð. Kringvarpið hevur millum annað skyldu at kunna føroyska almenningin við óheftum og álítandi tíðindum, og skal stovnurin eisini arbeiða í *fólksins tænastu* – altso skal Kringvarpið seta borgaran í fyrstu røð. Við sáttmálanum ber til at seta yvirskipaðar treytir fyri virkseminum hjá stovninum uttan at ávirka redaktionella arbeiðið. Men ein sáttmáli er ikki nóg mikið í sær sjálvum. Samsvar má vera millum tær ætlanir, ið stungnar eru út í kortið og fíggingina, sum skal til fyri at røkka hesum málum. Um hugt verður at Kringvarpinum í dag, so má staðfestast, at tað bert lutvíst er eydnast at skapa ein public service-stovn, ið livir upp til yvirskipaðar treytir um ein góðan public service-stovn. Og spurningurin er, um samsvar er millum inntøkurnar hjá Kringvarpinum og skyldurnar, sum public service-sáttmálin ásetir.

Kringvarpsstýrið varð á fyrsta sinni mannað í 2007. Hesin myndugleiki hevur styrkt frástøðuna millum politikararnar og Kringvarpið. Og fleiri hoyringarpartar hava givið til kennar, at eitt kringvarpsstýri er gott fyri Kringvarpið. Hinvegin halda serliga Føroysk Miðlafólk, at persónarnir í stýrinum skulu hava betri yrkisligar førleikar innan miðlaheimin. Fyri at styrkja um vitanina hjá Kringvarpsstýrinum um føroyskar miðlar og public service, kundi metingarstøðið verði broytt, tá stýrið fyri Kringvarpið verður mannað, so, at størri dentur verður lagdur á yrkisligar førleikar innan fyri public service og føroysk miðlaviðurskifti.

Lítla fólkagrundarlagið í Føroyum ávirkar útboðið av public service-tilfari, tí prísurin at framleiða góðar sendingar og innsløg í meginregluni er hin sami í Føroyum sum aðrastaðni. Kringvarpið vísir á, at framleiðslukostnaðurin fyri eitt nú eina Dagur & Viku longu er lægri samanborið við tíðindasendingar á øðrum public service-rásum, og at tað tí er trupult, við verandi inntøkum, at framleiða meira tilfar við somu góðsku. Undir hoyringunum er komið fram, at bæði privatir miðlar, Kringvarpið og aðrir myndugleikar sakna eina grundleggjandi viðgerð av, hvat føroyska samfelagið vil við Kringvarpinum. Henda viðgerðin má fyrst og fremst taka útgangsstøði í, um føroyska samfelagið hevur tørv á einum sterkum public service-stovni, og hvussu hesin stovnur skal fíggjast, soleiðis at stovnurin hevur hóskandi fíggjarligar karmar til framleiðslu av public service-tilfari. Ein annar spurningur, ið má svarast, er, um samfelagið skal tryggja, at føroyingar í framtíðini hava ein felags pall, har borgararnir eru tryggjaðir óheftan tíðindaflutning um politikk, mentan, fíggjarlig viðurskifti og onnur samfelagslig viðurskifti.

Føroyskt miðlatilfar kappast við útlendskt. Nøgdin og góðskan av føroyskum tilfari eru umráðandi barometur í kappingini við útlendskar miðlar. Hvørjar rásir og tíðindaportalar velja fólk, tá tey leita eftir kunning, tíðindum og undirhaldi? Hvussu nógv verri kann góðskan á føroyska innihaldinum vera, áðrenn fólk velja útlendska tilfarið framum? Og nær velja fólk føroyska tilfarið frá? Hetta eru spurningar, ið miðlar í nógvum málsliga smáum økjum seta. Svarið er ikki tað sama frá landi til land. Fólk, ið búgva í londum við fáum íbúgvum, og fólk, ið eru partur av einum málsligum minniluta, hava ymisk mørk fyri, nær heimliga miðlatilfarið ikki er nóg gott, og aðrir miðlar verða tiknir framum. Fyri at serliga Kringvarpið fær størri innlit í, hvat skal til, áðrenn fólkið velur sjónvarpið hjá Kringvarpinum frá, skulu íløgur gerast í útgerð, so kvantitativar kanningar verða framdar á sama hátt, sum í øðrum londum. Hetta gevur Kringvarpinum størri vitan um, hvørjir hyggjararnir eru, og hvat teimum dámar. Sama er galdandi á útvarpsøkinum. Áðrenn hetta verður veruleiki, má støðugt hyggjast eftir, hvussu avmarkaðu fíggjarkarmarnir hjá Kringvarpinum kunnu skapa so nógv og gott innihald til føroyingar sum gjørligt. Nøgdin av tilfari hevur

týdning, tí minni føroyskt tilfar verður framleitt, meiri tíð nýta fólk á útlendskum miðlum.

Sjónvarpið hjá Kringvarpinum er landsins dýrasti miðilin at reka í landinum. Í 2009 vóru beinleiðis útreiðslurnar fyri føroyska sjónvarpstilfarið í Kringvarpinum 18,3 mió. kr. Føroysk húski rinda árliga áleið 865 kr. beinleiðis til sjónvarpið. Sjónvarp er dýrt at framleiða. Samstundis sum lítið føroyskt tilfar verður sent, standa nógvar útlendskar sjónvarpsrásir hyggjarunum í boði. Lættast og bíligast hevði tí verið ikki at sent føroyskt public service-sjónvarp. Men uttan føroyskt public service-sjónvarp er ivasamt, um føroyingar høvdu fingið sama tíðindatilboð og kjak um politikk og mentan í føroyska samfelagnum. Tað hevði verið avmarkað, hvussu nógvar greiningar høvdu verið av mentanarlívi, politikki og vinnulívi, sæð við føroyskum eygum og miðlað í livandi myndum. Ivasamt er eisini, um ópartískur og sakligur tíðindaflutningur hevði verið í føroyskum sjónvarpi, um Kringvarpið ikki tók á seg henda leiklut.

Ásannandi at prosentparturin av føroyskum tilfari av samlaðu senditíðini í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum hevur verið lutfalsliga lítil, er spurningurin, um núverandi sjónvarpsútboð hjá Kringvarpinum er nøktandi, tá hugsað verður um, at tilfarið á føroyskum er avmarkað, samstundis sum talið á útlendskum rásum er stórt. Um føroyingar skulu hava ein føroyskan valmøguleika og ikki bara hyggja at útlendska tilfarinum, ið fleiri hava sæð frammanundan á t.d. DR, skulu tillagingar fremjast. Eitt av høvuðsendamálunum við public service er at skapa ein pall at miðla tilfar á tjóðarmálinum og at endurspegla mentanina í landinum. Longu tá føroyska sjónvarpið fór at senda, stóð í lógini, at *"Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðalæru."* Orðingin er í tráð við endamálið hjá public service-støðum, men føroyska sjónvarpið hevur ongantíð megnað at framleiða føroyskar sendingar burturav – ella tekstað útlendskar sendingar. Tí stendur núverandi samansetingin av tilfari í sjónvarpinum í roynd og veru í andsøgn við eitt av aðalmálunum hjá public service. Hóast prísurin á sjónvarpsframleiðslu er farin nógv niður seinastu árini, er enn talan um dýran

rakstur. Borgararnir hava skyldu at rinda kringvarpsgjald, og tí er sjálvsagt umráðandi, at Kringvarpið er munadygt og ábyrgdarfult. Tilgongdin at talgilda útgerðina hjá sjónvarpinum hevur givið føroyingum meira fyri kringvarpsgjaldið, men enn er tað kostnaðarmikið at framleiða sjónvarpstilfar. Hóast lutfalsliga dýru framleiðsluna áttu tøkniligu broytingarnar at latið upp fyri, at talið á føroyskum senditímum kundi verið hægri. Støddin á føroyska samfelagnum og avmarkaða talið á persónum, ið tosa føroyskt, ger, at tað er umráðandi, at Kringvarpið hugsar nýskapandi.

Hóast nýggir miðlar saman við eldri miðlum kappast um tíðina hjá fólki, so hyggja fólk framvegis at sjónvarpi fleiri tímar um dagin. Fyri at geva føroyingum ein føroyskan møguleika millum nógvu útlendsku rásirnar kundi ein loysn verið at tikið sendingar av skránni, ið eru beinleiðis tiknar frá útlendskum rásum, uttan at føroysk teksting ella onnur viðgerð er framd. Hetta hevði eisini elvt til nógvar nýggjar fyriskipanarligar møguleikar og givið stovninum størri ábyrgd at veitt fólki eina støðuga sjónvarpsframleiðslu. Størstiparturin av tilfarinum í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum eru sendingar, sum verða varpaðar víðari frá donskum sjónvarpi uttan ljóð- ella tekstviðgerð. Meginparturin av hyggjarunum hava í dag møguleika at síggja sendingarnar á donsku rásunum umvegis eitt nú fylgisveinasjónvarp. Henda sannroynd má eisini metast at vera ein av orsøkunum til, at nógvir borgarar hava ein illvilja ímóti at rinda kringvarpsgjaldið. Um sendingarnar frá donskum sjónvarpi ikki vóru partur av sjónvarpsskránni hjá Kringvarpinum, hevði nøgdsemið millum hyggjararnar óivað hækkað – treytað av at føroyska skráin varð útbygd.

Í public service-sáttmálanum millum Mentamálaráðið og Kringvarpið, er týðing av útlendskum tilfari nevnt. Í sáttmálanum stendur, at útlendskt tilfar eigur *"at verða ljóðsett við føroyskari talu ella tekstað á føroyskum máli"*. Á øðrum public service-rásum verður mett, at ein royndur persónur megnar at teksta umleið 25 minuttir av sjónvarpi ein arbeiðsdag. Talið á minuttum skal takast við fyrivarni, tí stórur munur er á talinum á orðum í ymiskum sendingum. Í public service-sáttmálanum stendur, at ætlanin er at framleiða 3 tímar av føroyskum teksti og føroyskari talu til vaksin um dagin. Um vit hyggja at teksting av føroyskum sendingum, hevði arbeiðsorkan til 3

tímar av føroyskum teksti um dagin verið áleið 8 starvsfólk ella 3,2 mió. kr. árliga. Teksting av útlendskum sjónvarpstilfari kann hava stóra ávirkan á menningina av føroyska málinum, tí føroyingar væntandi høvdu lisið nógv meiri tekst á føroyskum.

### 2.1.2 Broytt tíðindamentan

Einaferð vóru tíðindi dýr og trupul at fáa hendur á. Í dag eru tíðindi at fáa allastaðni og allatíðina. Fyrr var tíðindatilfarið avmarkað. Í dag eru tíðindi ikki ein avmarkað vøra og ofta ókeypis at nýta. Skjóta talgildingin av miðlunum og serliga alnetið merkja, at ferðin á tíðindaflutninginum er vaksin nógv. *The deadline is dead,* siga bretar. Fyrr komu bløðini eina ávísa tíð á degnum, og sjónvarpið og útvarpið sendu tíðindasendingar fastar klokkutíðir. Henda skipan gav miðlamynstrinum hjá fólki fast skap. Síðani alnetið hevur fingið stóra útbreiðslu, er mynstrið broytt. Hetta merkir ikki einans, at tíðindafólk hava styttri tíð at viðgera hvørja søgu og styttri tíð til granskandi tíðindaflutning. Stórur vandi er fyri, at ein størri partur av tíðindatilfarinum verður framleitt av stovnum, fyritøkum, politikarum og einstøkum persónum og ikki av tíðindafólki. Greið tekin eru um, at hetta eisini er støðan í Føroyum. Stórur partur av tí tilfari, ið serliga portalar, men eisini eldri miðlar geva út, er ikki redaktionelt viðgjørt ella eftirkannað. Størsti vandin við hesi gongd er, at tíðindamentanin verður niðurlagað soleiðis, at brúkararnir ikki við vissu kunnu lesa, síggja og hoyra tíðindi við trúvirði.

Umframt at nógv tíðindaskriv verða beinleiðis borin víðari til almenningin, arbeiðir ein alsamt størri partur av útbúnum tíðindafólki aðrastaðni enn á tíðindaredaktiónum. At nógvir miðlaráðgevar arbeiða í privatum fyritøkum, í politisku skipanini og almennu umsitingini er ein natúrlig gongd, sum eisini sæst í øllum øðrum framkomnum londum. Hesi fólk hava ofta stórt innlit í mannagongdirnar hjá tíðindafólkum og kenna til, hvussu miðlarnir eru settir saman. At hetta starvið verður alsamt vanligari, er eingin hóttan í sær sjálvum, men hetta skapar avbjóðingar fyri journalistiska fakið og miðlarnar sum heild. Tess størri trýstið verður frá øðrum áhugabólkum, tess verri verður at bera fram óheftan

tíðindaflutning, sum ikki er litaður av seráhugamálum. Ein av stóru fyrimununum við einum public service-stovni er, at hann kann virka óheftur av seráhugamálum.

Trýstið og ávirkanin frá øðrum áhugabólkum veksur alsamt, og tí kann ein framtíðar public service-stovnur verða við til at tryggja fólkinum ein sakligan og óheftan tíðindaflutning. Ein framhaldandi alment fíggjaður public service-stovnur kann tískil tryggja redaktionelt frælsi. Ein týðandi spurningur at viðgera út frá einum fólkaræðisligum sjónarhorni er tískil, hvussu leikluturin hjá tíðindafólkum kann styrkjast. Við øðrum orðum eitt yrkisumhvørvi, har tíðindafólkini vísa ábyrgd fyri kravinum um óheftan tíðindaflutning og kravinum um at kunna borgararnar. Hetta krevur millum annað, at fakliga mentanin á stovninum verður styrkt. Fyri at stuðla hesi tilgongd spælir fíggjarliga støðan hjá Kringvarpinum, hugburðurin hjá leiðslu og starvsfólki til yrkisliga menning, og eisini inntøkurnar hjá tíðindafólkum, avgerandi leiklut. Kringvarpið hevur víst á, at fleiri útbúgvin tíðindafólk velja annað arbeiðspláss enn Kringvarpið, millum annað tí at lønin er betri aðrastaðni.

### 2.1.3 Avbjóðingar hjá public service í framtíðini

Kringvarpið virkar í einum heimi við nógvum valmøguleikum og nógvari kapping. Fólk hava fleiri tilboð enn nakrantíð áður og nýta fleiri miðlar og fleiri keldur at savna inn kunning. Televarpið hjá Føroya Tele byrjaði at senda fylgisveinasjónvarp 5. desember 2002. Nógvir føroyingar sóu útlendskar sjónvarpsrásir, áðrenn Føroya Tele fór at bjóða útlendskar rásir í Føroyum, men Føroya Tele hevur gjørt útbreiðsluna av fylgisveinasjónvarpi munandi størri. Av teimum 17.000 húskjunum í Føroyum hava áleið 15.500 kaðalsjónvarp, fylgisveinasjónvarp ella DVB-T hald. Tað eru serliga smærri pláss, sum enn bara síggja sjónvarpið hjá Kringvarpinum. Tølini vísa, at nógvar útlendskar rásir standa hyggjarunum í boði. Føroyski public service-stovnurin kann bjóða borgarunum ein heimligan valmøguleika, ið savnar træðrirnar og greinar samfelagið við støði í innanríkis viðurskiftum, ið altíð víkja frá øðrum londum. Serstøðan hjá public service á heimliga marknaðinum gevur útlendska tilfarinum kapping, men nógvu útlendsku serrásirnar og møguleikarnir á alnetinum gera, at public service-stovnurin ikki kann kappast um talið á senditímum.

Styrkin hjá Kringvarpinum er fyrst og fremst tilfarið, ið verður miðlað á føroyskum. Eina góða, breiða og óhefta tíðindatænastu á føroyskum kunnu útlendskir miðlar ikki kappast við. Umvegis fylgisvein og kaðal hava føroysku lurtararnir og hyggjararnir atgongd til nógvar sjónvarpsrásir frá altjóða miðlaveitarum. Royndir úr Svøríki vísa, at public service-rásin í landinum missir hyggjarar, tá ið útboðið verður størri. Vit vita ikki við vissu, um sama er galdandi í Føroyum. Hóast flestu føroyingar síggja fleiri sjónvarpsrásir, er umráðandi at vita, at størsti fyrimunurin hjá eini føroyskari public service-støð er tilfar á føroyskum um føroysk viðurskifti og útlendsk viðurskifti sæð við føroyskum eygum. Í Føroyum hava vit ikki regluligar mátingar av miðlanýtsluni hjá føroyingum, men vanliga verður mett, at er marknaðarparturin hjá public service minni enn 20%, fær stovnurin trupult at rættvísgera sína tilveru.

Í øðrum londum nýta ung minni tíð á public service-miðlum, og serliga fer nýtslan frá eldri miðlum til alnetið. Hóast hagtøl ikki eru til taks í Føroyum, ið vísa, at hetta eisini er støðan í Føroyum, so kunnu vit ganga út frá, at so er. Fyri at røkka teimum ungu er tískil neyðugt at vera har, ið tey ungu eru. Sum dømi kann nevnast, at tannáringar í Týsklandi í aldrinum 14-19 ár nýta meira tíð á netinum enn framman fyri sjónvarpi. Alnetið er ein stórur partur av gerandisdegnum hjá ungum fólki, og tí kann eitt sterkt tilboð frá Kringvarpinum til ung á netinum vera við til at røkka hesum málbólki. Umleið 80% av tíðini, ið ung nýta á netinum, verður nýtt til at skapa, halda og røkta sosial sambond.

At føroyingar veruliga hava tikið alnetið til sín, sæst á talinum á breiðbandshaldum, sum í dag er oman fyri 16.300. Talið av haldum er meir enn tvífaldað seinastu 5 árini.

## 2.2 Framleiðslan í Kringvarpinum

Talið á tíðindafólkum í Kringvarpinum svarar til tvífalt samlaða talið á tíðindafólkum í privatu miðlunum í Føroyum. Umleið 38 mió. kr. av útreiðslunum í Kringvarpinum fara til fastar lønir. Slakar 16 mió. kr. fara til streym, olju, útgerð, rættindi o.s.fr.. Hetta merkir, at áleið 6 mió. kr. eru eftir til at gera sendingar, ið millum annað kunnu

keypast uttan fyri húsið. Skal tíðindadeildin senda út yvir vanligu senditíðina, skal upphæddin eisini takast av teimum 6 mió. kr. Kringvarpið vísir á, at fær stovnurin nakrar milliónir krónur eyka at arbeiða við, ber beinanvegin til at hækka talið á sendingum munandi.

Taka vit støði í 2009, framleiddi Kringvarpið 391 tímar av sjónvarpi og 3219 tímar av útvarpi. Sjónvarpsframleiðslan fer við 59% av beinleiðis útreiðslunum og útvarpið við 41%. Niðanfyri sæst, hvussu peningurin verður nýttur í ávikavist sjónvarpinum og útvarpinum.




Mynd 1, Sjónvarpið




Mynd 2, Útvarpið

Sum myndirnar vísa, fer størsti parturin av útreiðslunum til at framleiða *Tíðindi og aktuelt* bæði í sjónvarpinum og útvarpinum. Mentanarparturin er størri í útvarpinum, meðan ítrótturin fer við einum stórum parti av útreiðslunum í sjónvarpinum. Hvør minuttur í sjónvarpinum kostar í løtuni 1200 kr. í broytiligum kostnaði umframt 944 kr. í føstum kostnaði. Hvør minuttur í Kringvarpinum kostar sostatt 2144 kr. Samanbera vit framleiðslukostnaðin í Føroyum við eitt nú Bornholm, so er kostnaðurin fyri hvønn minutt av sjónvarpstilfari bíligari í Føroyum. Á Bornholm er broytiligi kostnaðurin fyri hvønn minutt av sjónvarpi 1700 kr.

Hóast framleiðslan í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum er bílig samanborin við aðrar rásir við public service-skyldum, so meta serliga privatu miðlarnir, at Kringvarpið eigur at gera meira fyri peningin, sum stovnurin fær árliga. Tøknin er betrað nógv seinastu árini. Hetta ger tað bíligari at framleiða, umframt at fleiri fólk, ið fyrr vóru avskorin frá sjónvarpsframleiðslu, hava møguleika at gera sjónvarpstilfar. Fyri at fáa fleiri senditímar skjóta umboð fyri privatar sjónvarpsstøðir og Miðlahúsið upp, at fastur partur av sjónvarpsframleiðsluni skal leggjast uttan fyri húsið – altso á fría marknaðin. Í hesum sambandi er umráðandi at leggja aftrat, at flestu føroyingar eru royndir sjónvarpshyggjarar, og at fólk altíð samanbera føroyska tilfarið við útlendska sjónvarpstilfarið, ið hyggjararnir kenna mest til. Verður góðskan ov lág, velja hyggjararnir sendingarnar frá – eisini føroyskar sendingar.

Ikki bert føroysku kappingarneytarnir hjá Kringvarpinum hava á lofti, at Kringvarpið eigur at framleiða meira fyri pengarnar. Eisini í almenna orðaskiftinum kemur fatanin ofta fram, at Kringvarpið kundi veitt eina betri tænastu og gjørt meira tilfar við verandi inntøkum.

Fyri at kanna, um so er, at Kringvarpið átti at klárað at gjørt meira fyri pengarnar, er áhugavert at samanbera úrtøkuna hjá Kringvarpinum við úrtøkuna hjá øðrum líknandi public service-stovnum. Føroyska samfelagið er tó so serstakt, at tað ber illa til at samanbera Kringvarpið við aðrar public service-stovnar, umframt at samanberingargrundarlagið í flestu førum ikki er nóg gott. Ein roynd at samanbera kann gerast við Grønland, sum hevur á leið sama fólkatal sum Føroyar.

Kringvarpið og grønlendska KNR hava fleiri líkleikar. KNR er sjálvstøðugur almennur stovnur eins og Kringvarpið. Játtanin til KNR verður tó ásett á grønlendsku fíggjarlógini, har inntøkurnar í Føroyum stava frá lógarásettum kringvarpsgjaldi. Báðir stovnar fáa harumframt inntøkur frá lýsingum og sponsorering. Samlaðu inntøkurnar hjá KNR vóru í 2009 65,7 mió. kr. og hjá Kringvarpinum 59,1 mió. kr. Í føroyska public service-sáttmálanum stendur, at Kringvarpið í 2009 framleiddi 3219 tímar av útvarpi og 391 tímar av sjónvarpi. Í grønlendska public service-sáttmálanum *Resultatkontrakt mellem KNR og Naalakkersuisut for årene 2009 til og med 2012*

*(knr.gl),* verður upplýst, at KNR framleiddi 2590 tímar útvarp og 289 tímar sjónvarp í 2009. Út frá hesum upplýsingum framleiddi Kringvarpið meira enn KNR, hóast lægri inntøku enn KNR. Henda niðurstøða sigur tó einki um góðskuna á framleiddu sendingunum, men bendir tó á tann bógvin, at kringvarpsframleiðslan stendur mát við tað, sum mann kann vænta av stovninum. Í hesum viðfangi kann verða upplýst, at í Grønlandi er fyri kortum álit skrivað, ið rópar varskó um týdningin av at fáa fleiri inntøkur til almennu grønlendsku miðlarnar, harundir KNR. Sagt verður, at ov lítið av fígging er til at gera dygdargott journalistiskt arbeiði, og at umráðandi er við betri útbúgvingarmøguleikum innan miðlar í Grønlandi.

## 2.3 Talgilt sjónvarpssendinet

Nógvar tænastur og vørur eru seinastu árini vorðnar talgildar. Og gongdin verður hin sama í framtíðini. Hetta er eisini galdandi á miðlaøkinum, har eitt nú talgilt útvarp (DAB) og sjónvarpsrásir eru talgildar. Øll tey skandinavisku londini hava sløkt analoga sendinetið og hava innført talgilt sendinet. At føroyingar síggja sjónvarpsrásina hjá Kringvarpinum talgilda, metir arbeiðsbólkurin, er eitt neyðugt stig at taka í Føroyum. Útvarpssendinetið skal kortini ikki talgildast.

Allir føroyingar hava í dag møguleikan at síggja sjónvarpssendingarnar hjá Kringvarpinum á analoga sendinetinum. Haraftrat sendir Televarpið hjá Føroya Tele sjónvarpsrásina hjá Kringvarpi Føroya ókeypis á sínum talgilda sendineti. Talgilda sendinetið hjá Televarpinum røkkur út til 94% av føroysku húskjunum. Hini 6% síggja sendingarnar í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum gjøgnum analoga sendinetið. Á fíggjarlógini verða árliga játtaðar 4,2 mió. kr. til at reka kringvarpssendistøðir fyri. Arbeiðsbólkurin er av teirri fatan, at tíðin er farin frá analogari útgerð á sjónvarpsøkinum. Tað ber kortini ikki til at oyramerkja partar av játtanini á fíggjarlógini til at útbreiða talgilda sendinetið. Verður analoga sendinetið sløkt í talgildingartilgongdini, áðrenn allir føroyingar síggja sjónvarpsrásina hjá Kringvarpinum talgilda, síggja seinastu 6% - ið umboða smá pláss í Føroyum – einki sjónvarp. Analoga sendinetið má tískil senda, til talgilda útbyggingin er liðug. Hetta merkir, at ein serlig játtan skal til útbyggingina.

Haraftrat skal serligt kunningarátak gerast í sambandi við, at analoga netið verður sløkt, tí borgararnir mugu upplýsast um, hvussu sjónvarpið verður sett til talgildu rásina. Fólk skulu somuleiðis kunnast um, at húski, ið einans hava eldri sjónvarp, mugu keypa eyka útgerð, so talgilda rásin kann móttakast.

Sum nevnt í 2.1.3, er størsta styrkin hjá eini føroyskari sjónvarpsrás tilfarið, ið verður miðlað á føroyskum. Verður sjónvarpsrásin hjá Kringvarpinum talgildað, broytir hetta í sær sjálvum ikki sendiskránna hjá sjónvarpinum hjá Kringvarpinum. Til ber framhaldandi hjá Kringvarpinum at varpa nógva útlendska sjónvarpstilfarið uttan føroyska viðgerð. Talgildingin er kortini eitt gott høvi at broyta kós, og at geva føroysku rásini ein sterkari føroyskan samleika. Um hetta stig verður tikið, hevði Kringvarpið fingið lættari við at skilmarka egnan leiklut í kappingini við útlendskar sjónvarpsrásir og útlendsku sendingarnar, ið vanliga fylla stóran part av senditíðini hjá Kringvarpi Føroya. Føroyska kringvarpsrásin hevði fingið ein sterkari føroyskan samleika og væntandi nøgdari hyggjarar. Ein føroysk rás burturav hevði skapt størri trúfesti til føroysku rásina. Broytingin frígevur tó ikki nógva arbeiðsorku til framleiðslu av føroyskum tilfari. Skal føroyska senditíðin víðkast, krevur hetta sostatt meiri pening, og hetta er neyðugt, skal Kringvarpið kappast við nógva útlendska tilfarið.

Fyri at veita hyggjarunum eina eyka tænastu kundi avtala verðið gjørd við Føroya Tele, so grannalanda public service-rásirnar verða varpaðar ókeypis á sendinetinum hjá Føroya Tele.

Heilt stórur partur av føroyingum síggja longu grannalanda public service-rásir, og tí kundu stig longu nú verið tikin til at senda RÚV, NRK, DR og SVT ókeypis sum ein part av public service tilboðinum hjá Kringvarpinum. Hetta krevur samráðingar við Føroya Tele.

# 3 Fíggjarlig viðurskifti í Kringvarpinum

Tá ið hugt verður eftir, hvussu Kringvarpið skal skipast í framtíðini, er fíggingin av stovninum avgerandi. Hetta er eisini komið fram undir hoyringunum. Bæði umboð fyri Kringvarpið og aðrir hoyringarpartar hava givið fíggingini nógva umrøðu. Partur av arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum er at lýsa, hvussu Kringvarpið kann fíggjast í framtíðini. Orsøkirnar til at hyggja nærri eftir øðrum fíggingarhættum eru tengdar at:

- Tað tykist sum, at nógvir borgarar hava ein illvilja ímóti at rinda kringvarpsgjaldið við girokorti
- Inntøkurnar hjá Kringvarpinum eru ikki hækkaðar seinastu árini hóast lønarhækkingar og prísvøkstur.
- Kringvarpið kappast við privatar miðlar um lýsingainntøkur

Í dag rinda øll húski 1.812,50 kr. hálva hvørt ár í kringvarpsgjaldi, og upphæddin verður goldin við girokorti. Fólk hava skyldu at rinda kringvarpsgjald um sjónvarp, útvarp, alnet ella fartelefon við alnet er partur av húskinum. Hetta merkir í roynd og veru, at øll húski hava skyldu at gjalda kringvarpsgjaldið. Kringvarpsgjaldið verður roknað fyri hvørt húski og leggur ikki upp fyri, hvussu nógv fólk eru í húskinum. Øll húski rinda somu upphædd uttan atlit at inntøkugrundarlagnum hjá húskinum.

Avleiðingarnar av verandi fíggingarhátti eru bæði góðar og ringar.

Tær góðu avleiðingarnar eru:

- Kringvarpið er ikki tengt at fíggjarlógini
- Lýsingainntøkurnar geva Kringvarpinum betri fíggjarligt grundarlag
- Lýsingainntøkurnar gera, at kringvarpsgjaldið ikki er uppaftur hægri

Tær ringu avleiðingarnar eru:

- Privatir miðlar missa inntøkur, tí Kringvarpið fær lýsingainntøkur
- Tað kann kennast lutfalsliga dýrari hjá lágløntum og støkum at gjalda kringvarpsgjaldið
- Tað er kostnaðarmikið at krevja inn kringvarpsgjald við girokorti
- Kringvarpsgjaldið verður ikki prístalsjavnað.
- Inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpinum sveiggjar við búskaparligu gongdini í landinum
- Lýsinga- og spæliinntøkurnar sveiggja

Núverandi fígging er ikki einasti máti at fíggja Kringvarpið. Aðrir fíggingarmøguleikarnir eru:

- Kringvarpsgjald og ongar lýsingainntøkur
- Einans lýsingafíggjað
- Umvegis skattaskipanina:
    - Yvir skattin (3.2)
    - Fast gjald (3.3.1)
    - Fastur prosentpartur av inntøkuni (3.3.2)

## 3.1 Núverandi fígging av Kringvarpinum

Virksemið hjá Kringvarpi Føroya verður fíggjað við kringvarpsgjaldi, kunngerðar- og lýsingainntøkum, sponsorering og øðrum virksemi, sum er knýtt at uppgávum stovnsins. Um vit taka 2010 sum dømi, vóru samlaðu inntøkurnar hjá Kringvarpinum 61,5 mió. kr. Talva 1 vísir inntøkurnar hjá Kringvarpinum býttar upp í bólkar.

**Talva 1: Inntøkur í 2010 hjá Kringvarpinum í mió. kr.**

| **Inntøka:** | |
|---|---|
| Kringvarpsgjaldið | 46,6 |
| Kunngerðir og lýsingar | 8,3 |
| Spæliinntøkur | 5,6 |
| Aðrar inntøkur | 0,9 |

| | |
|---|---|
| **Samlaðar inntøkur** | **61,5** |

Lýsingar og kunngerðir eru áleið 15% av samlaðu inntøkunum hjá stovninum. Hyggja vit eftir øðrum londum, har kringvarpsstøðirnar hava lýsingainntøkur, so er prosentparturin í Føroyum lægri. Í íslendska RÚV eru 31% lýsingar og sponsorering, og hjá SRG SSR í Sveis og RTÉ í Írlandi eru 30% lýsingar og sponsorering.

Skal kringvarpsgjaldið hækka, skal løgtingið samtykkja hækkingina. Tað hevur ikki verið undirtøka fyri at hækka kringvarpsgjaldið, ið hevur staðið í stað síðani 2005. Í sama tíðarskeiði er føroyska brúkaraprístalið vaksið 12% (hagstova.fo), og keypiorkan hjá Kringvarpinum minkað samsvarandi í hesum tíðarskeiði. Vantandi inntøkurnar hjá Kringvarpinum eru ein av stóru avbjóðingunum hjá stovninum. Til dømis er talið á starvsfólkum í tíðarskeiðinum 2004-2009 lækkað við 30. Lønirnar á almenna arbeiðsmarknaðinum hækkaðu við 1% 1. oktober 2010. Hetta merkir, at Kringvarpið hevur umleið 400.000 kr. meira í lønarútreiðslum um árið. Útreiðslurnar til lønir eru, sambært Kringvarpinum, hækkaðar við 25% síðani 2004. Kringvarpsgjaldið verður ikki prístalsviðgjørt, og tí vísir Kringvarpið á, at politikararnir óbeinleiðis hava niðurlagað inntøkurnar hjá stovninum við tilsamans umleið 20 mió. kr. síðani 2004.

Umframt minkandi virði av kringvarpsgjaldinum, sveiggja spæliinntøkurnar nógv, og sæð yvir eitt longri áramál eru tær minkandi. Um hugt verður eftir orsøkini til, at Gekkurin byrjaði í 1997, var hetta orsakað av vantandi fígging. V4 var upprunaliga stovnað fyri at fíggja útvarpshúsið í Sortudíki. At spæliinntøkurnar ikki eru eitt trygt fíggjarligt íkast, sæst aftur í 2010, tá Gekkurin gekk illa, og gongdin við Gekkinum sást aftur í fíggjarætlanini hjá Kringvarpinum. Spølini í Kringvarpinum eru altso komin orsakað av fíggjarligum troti. Hóast spæliinntøkurnar eru minkandi, fíggja tær ein fittan part av virkseminum hjá stovninum. Góðu árinini av spæliinntøkunum eru, at Kringvarpið fær meira pening til framleiðslu av sendingum. Hinvegin er sveiggjandi undirtøkan millum manna við til at minka støðufestið hjá stovninum.

### 3.1.1 Kringvarpsgjaldið

Stóri fyrimunurin við verandi kringvarpsgjaldi er, at innkomni peningurin fer beinleiðis til Kringvarpið, og at politiska skipanin á tann hátt ikki ávirkar innihaldsliga partin av virkseminum hjá stovninum. Hetta hava Kringvarpið og kringvarpsstýrið eitt nú víst á. Hinvegin kann staðfestast, at ávís ónøgd er millum borgararnar. Fleiri orsøkir eru til tess. Borgararnir fáa sendandi eitt girokort, og tí verður gjaldið til Kringvarpið meira ítøkiligt samanborið við aðrar tænastur, sum borgararnir rinda fyri umvegis skattaskipanina. Kringvarpsgjaldið er sera sjónligt, og hetta í sær sjálvum ávirkar hugburðin til stovnin. Harafturat fær borgarin færri tímar av miðlatilfari fyri peningin í Føroyum samanborið við onnur lond – samstundis sum gjaldið er tað hægsta í øllum Norðurlondum. Kringvarpsgjaldið í Norðurlondum fyri 2011 sæst niðanfyri:

- **Føroyar** 3625 DKK – umleið **9,9 DKK um dagin** (0,048 mió. fólk)
- **Norra** 2355 DKK – umleið **6,5 DKK um dagin** (4,5 mió. fólk)
- **Danmark** 2300 DKK – umleið **6,3 DKK um dagin** (5,5 mió. fólk)
- **Finland** 1875 DKK – umleið **5,1 DKK um dagin** (5,3 mió. fólk)
- **Svøríki** 1723 DKK umleið **4,7 DKK um dagin** (9,4 mió. fólk)
- **Ísland** 780 DKK – umleið **2,1 DKK um dagin** (0,3 mió. fólk)

Í øllum londum – undantikið Íslandi – er árliga kringvarpsgjaldið víst pr húski. Allir íslendingar yvir 16 ár rinda 780 DKK um árið, og skal hetta talið tískil síggjast við ávísum fyrivarni samanborið við hini. Sum tølini omanfyri vísa, er kringvarpsgjaldið í Føroyum høgt samanborið við onnur Norðurlond. Høgi kostnaðurin saman við øðrum viðurskiftum – eitt nú sjónliga gjaldið – ger, at umrøðan av Kringvarpinum ofta er neilig. Kringvarpsstýrið vísir millum annað á, at hetta er óheppið, tí fólk lætt gloyma stóra týdningin, sum Kringvarpið hevur og hevur havt. Tað er lætt at finnast at Kringvarpinum við verandi fígging, og hetta er ein av orsøkunum til, at aðrir fíggingarhættir verða viðgjørdir í 3.2-3.3.2. Her er umráðandi at hava í huga, at tað ber ikki til at samanbera útreiðslurnar til public service í Føroyum beinleiðis við somu útreiðslur í størri londum. Kostnaðurin fyri public service verður altíð størri í londum við lítlum fólkagrundarlagi.

### 3.1.2 Søguliga gongdin

Kringvarp Føroya var skipað 1. januar 2005, tá ið Útvarpið og Sjónvarpið vórðu samanløgd. Síðani stovnarnir vóru lagdir saman, hevur eingin hækking verið í kringvarpsgjaldinum. Útvarps- og sjónvarpsgjaldið var seinast hækkað í 2004. Brúkaraprístalið er vaksið síðani 2004, og tískil er Kringvarpsgjaldið minni vert í dag samanborið við 2004. Mynd 3 vísir virðið í 2004-prísum á teimum 3.625 kr., sum eitt húski rindar til Kringvarpið árliga.




Mynd 3

Mynd 4 vísir, at árligu inntøkurnar hjá Kringvarpinum hava sveiggjað við nøkrum milliónum. Serliga spæliinntøkurnar eru óstøðugar. Lýsingainntøkurnar broytast eisini hvørt ár. Sjónligasta broytingin seinastu árini er, at inntøkurnar fyri kringvarpsgjaldið eru hækkaðar við góðum 6 mió. kr. higartil í 2011, og hetta er orsakað av, at Kringvarpið hevur fingið betri heimild til at krevja inn kringvarpsgjald.




Mynd 4

Á mynd 5 niðanfyri sæst, at inntøkurnar hjá Kringvarpinum seinastu árini ikki hava fylgt brúkaraprístalinum. Hetta merkir, at Kringvarpið hevur havt minni pening um hendi til at keypa tænastur og rinda fastar lønir. Við lógarbroytingini í 2010, ið gevur Kringvarpinum víðkaða heimild at krevja inn kringvarpsgjald, eru inntøkurnar hjá Kringvarpinum í 2011 komnar nærri brúkaraprístalinum. Hetta tryggjar kortini ikki fíggjarligu støðuna hjá Kringvarpinum í framtíðini, tí brúkaraprístalið fer væntandi at vaksa.




Mynd 5

### 3.1.3 Lýsingainntøkur í Kringvarpinum

Kringvarpið verður í dag fíggjað við kringvarpsgjaldi, lýsingum, sponsoreringum og spæliinntøkum. Hetta verður á enskum rópt *dual funding*. Hesin leistur er nógv nýttur í øðrum londum - undantikið hini Norðurlondini. Lýsingainntøkur vóru upprunaliga ikki partur av inntøkugrundarlagnum hjá útvarpinum og sjónvarpinum. Ein public service-miðil skal í meginregluni fíggjast *av* fólkinum, tí public service er *til* fólkið, men orsakað av vantandi fíggjarorku og einum ynski um at víðka sendiskránna, hava stovnarnir gjørt av, at gjógvin millum prísin fyri at framleiða public service-tilfar og inntøkurnar fyri kringvarpsgjaldið kann minkast, um lýsingar eru partur av fíggjarliga grundarlagnum. Meinbogin við hesari loysn er, at Kringvarpið kappast beinleiðis við privatu miðlarnar um lýsingainntøkur. Og harafturat er inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpinum ikki støðugt, tí spæliinntøkurnar eru sveiggjandi og lýsingainntøkurnar eru tengdar at fíggjarligu gongdini í landinum.

Tað er givið, at public service-miðlarnir eru meira óheftir, um teir ikki verða fíggjaðir partvíst av lýsingavirksemi og sponsorering. Um ætlanin er at loysa Kringvarpið so nógv frá handilsligum áhugamálum sum gjørligt – og harvið styrkja meginregluna um armslongd - er skilabest, at Kringvarpið einans verður fíggjað við beinleiðis kringvarpsgjaldi. Umframt at geva kringvarpsstovninum trúvirðistrupulleikar, er núverandi fíggingarleisturin eisini við til at tyngja livigrundarlagið hjá privatu miðlunum. Lóggávan gevur Kringvarpinum møguleika at lýsa við handilslýsingum – hóast tað í viðmerkingunum í álitinum til løgtingsmál nr. 114/2005 stendur, at lýsingainntøkurnar hjá Kringvarpinum skulu niðurlagast yvir eitt 5 ára tíðarskeið. Kappingarráðið vísir á, at Kringvarpið hevur møguleikan at lýsa, men at tað skal vera varliga og ikki ov nógv.

Tað eru ikki bara privatu miðlarnir, ið ikki ynskja, at Kringvarpið fær lýsingainntøkur. Nógv starvsfólk í Kringvarpinum ynskja somuleiðis, at stovnurin slítur seg leysan frá lýsingunum, men mistu inntøkurnar skulu uppvigast við øðrum inntøkum. Kringvarpsstýrið heldur somuleiðis, at tað ber ikki til at niðurlaga lýsingainntøkurnar í Kringvarpinum, uttan at fíggingin verður uppvigað.

Kringvarpið fær árliga umleið 4 mió. kr. inn fyri at lesa kunngerðir. Hesi uppgávuni hava privatu miðlarnir einki ímóti, at Kringvarpið tekur sær av. Kringvarpið sær somuleiðis hesa uppgávuna sum eina samfelagsliga skyldu, ið gevur samfelagnum eitt meirvirði.

Samskiftisfyritøkurnar eru ímóti, at Kringvarpið ikki sleppur at lýsa. Tær grundgeva millum annað við, at tað eru fyritøkur, ið ikki ynskja at lýsa í eitt nú Rás2, men í útvarpinum hjá Kringvarpinum, tí fyritøkurnar náa málbólkinum í Kringvarpinum, men ikki við lýsingum í Rás2. Haraftrat er sjónvarpið hjá Kringvarpinum einasta stóra føroyska sjónvarpsrásin, ið kann senda sjónvarpslýsingar á føroyskum. Føroysk Miðlafólk spyrja hinvegin: er Kringvarpið til fyri lýsararnar og lýsingafyritøkurnar ella fyri fólkið?

## *3.2 Kringvarpsgjaldið yvir skattin*

Við hesi skipan verður gjaldið lagt inn í skattaskipanina. Stóri politiski spurningurin, um kringvarpsgjaldið verður lagt yvir í skattin, er, hvussu gjaldið skal leggjast inn. Um gjaldið verður lagt javnt inn á allan skattastigan, eru fleiri, ið rinda munandi minni enn í dag og onnur munandi meira. Skal Kringvarpið hava somu inntøkur sum í dag, fara persónar við miðal og høgum inntøkum at rinda munandi meira til Kringvarpið samanborið við í dag. Verður gjaldið lagt lægst á skattastiganum, verður progressivi skattastigin flatari samanborið við í dag. Til ber ikki at býta gjaldið eftir húskjum, tí hetta er ikki ein innbygdur partur av skattaskipanini, og tískil verður ein umskipan frá stórum til smá húski. Harafturat rinda persónar, ið eru skrásettir í FAS og DIS skipanini ikki til Kringvarpið, um gjaldið fer yvir skattin. Sostatt skulu hinir borgararnir rinda fyri henda bólkin.

Kringvarpið hevur sjálvt víst á, at besta loysnin fyri stovnin er, um Kringvarpsgjaldið fer yvir skattin. Kringvarpið metir, at ein sokallaður 5-ára miðlasáttmáli við fastari upphædd til stovnin hevði verið skilabest, tí hetta hevði forðað fyri beinleiðis politiskari uppílegging.

Um kringvarpsgjaldið verður avtikið og lagt yvir í skattin, fer peningurin ikki beinleiðis til Kringvarpið. Kringvarpið skal tískil – sum aðrir almennir stovnar – biðja um pening á fíggjarlógini á hvørjum ári. Tí er ikki vist, at ynskið hjá Kringvarpinum um at gera 5-ára sáttmála verður fylgt. Tað er eisini hugsandi, at nógvir aðrir stovnar á fíggjarlógini kundu ynskt sær ein 5-ára sáttmála.

Mett verður ikki, at tað er uppgávan hjá arbeiðsbólkinum at viðgera verandi skattaskipan og progressivitetin í henni. Hetta er ein onnur politisk uppgáva. Tí verður skatturin roknaður eftir, at kringvarpsgjaldið verður kravt inn gjøgnum verandi skattaskipan – altso broytist skattastigin líka.

Ein meting hjá Fíggjarmálaráðnum vísir, at skal Kringvarpið í 2011 fáa 48 mió. kr. inn í kringvarpsgjaldi, og upphæddin verður kravd inn umvegis skattaskipanina, so má landsskatturin hækkast 0,75%-stig á øllum skattastigum.
Missir Kringvarpið haraftrat møguleikan at fáa lýsingainntøkur, og umleið 6 mió. kr. skulu uppvigast, verður hækkingin sløk 0,9%-stig.

Sostatt veksur marginalskatturin upp í sløk 59% hjá persónum við inntøkum oman fyri 250.000 kr./ár og sløk 61% hjá persónum við inntøkum oman fyri 400.000 kr./ár. Hesar metingar eru gjørdar út frá skattatrýstinum fyri 2011.

Talva 2 vísir gjaldið til Kringvarpið býtt upp í inntøkubólkar.

| | **Við lýsingum, sum í dag** | | **Uttan lýsingar*** | |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøka (kr/ár)** | Gjald á 0,75% (kr/ár) | Fyri húski við 2 persónum (kr/ár) | Gjald á 0,9% (kr/ár) | Fyri húski við 2 persónum (kr/ár) |
| **50.000** | 375 | 750 | 450 | 900 |
| **100.000** | 750 | 1500 | 900 | 1800 |
| **150.000** | 1125 | 2250 | 1350 | 2700 |
| **200.000** | 1500 | 3000 | 1800 | 3600 |
| **250.000** | 1875 | 3750 | 2250 | 4500 |
| **300.000** | 2250 | 4500 | 2700 | 5400 |
| **350.000** | 2625 | 5250 | 3150 | 6300 |
| **400.000** | 3000 | 6000 | 3600 | 7200 |
| **450.000** | 3375 | 6750 | 4050 | 8100 |
| **500.000** | 3750 | 7500 | 4500 | 9000 |

**Vantandi inntøkur frá lýsingum uppvigast við gjaldi frá borgarunum* Talva 2

## 3.3 Gjald umvegis skattaskipanina

Ein háttur at fíggja Kringvarpið er við at taka inn eitt gjald umvegis skattaskipanina. Gjaldið kann annaðhvørt vera sum ein føst upphædd ella sum ein fastur prosentpartur av inntøkuni.

Tølini, sum Fíggjarmálaráðið hevur gjørt í sambandi við álitið, eru fyribils metingar. Um politisk undirtøka er fyri at leggja kringvarpsgjaldið inn í skattaskipanina, má nýggj meting gerast, ið tekur atlit at nýggjastu framskrivingunum av skattainntøkunum. Støða verður ikki tikin til allar praktiskar og politiskar spurningar, sum eru knýttir at skipanini, ið verður vald.

### 3.3.1 Fast gjald

Verður Kringvarpið fíggjað við fastari upphædd í skattinum, verða allir persónar javnsettir viðvíkjandi gjaldi. Við hesi skipan verður upphæddin kravd inn samstundis sum skatturin og beinleiðis til Kringvarpið. Persónar uttan A-inntøku fáa í staðin sendandi girokort frá TAKS. Hetta er sama skipan, sum verður nýtt til Heilsutrygd. Við hesum leisti ber ikki til at býta skattin upp í húski. Tískil fara húski við meira enn tveimum persónum yvir 18 ár at rinda meira samanborið við í dag og persónar, ið búgva einsamallir, minni. Hesin leistur broytir ikki ynskini hjá teimum, ið ynskja eina meira progressiva skipan. Ein fyrimunur við hesum leisti er, at inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpinum er støðugt, tí gjaldið ikki er tengt at búskaparligu gongdini í landinum. Um upphæddin skal prístalsviðgerast, skal hetta inn sum partur av lóggávuni, annars verður sami trupulleiki sum í dag við minkandi inntøkugrundarlagi.
Ein fyrimunur við føstum gjaldi er, at tað fer beinleiðis til Kringvarpið. Minkandi skattainntøkur hjá landinum í lágkonjunkturum fara ikki at ávirka inntøkurnar hjá Kringvarpinum.

Um heilsutrygd verður nýtt sum fyrimynd, fer gjaldið at verða áleið soleiðis:

| | Gjald fyri hvønn (kr/mð) | Gjald fyri hvønn (kr/ár) | Húski við 2 persónum yvir 18 ár (kr/ár) |
|---|---|---|---|
| **Við lýsingum, sum í dag** | 140 | 1680 | 3360 |
| **Uttan lýsingar*** | 155 | 1866 | 3732 |

** vantandi inntøkur kravdar inn yvir gjaldið* *Talva 3*

Um eitt húski telur meira enn 2 persónar yvir 18 ár, verður gjaldið fyri húskið munandi hægri. Útrokningin tekur ikki atlit at ávísum bólkum í samfelagnum – altso rinda eitt nú lesandi og fólkapensionistar sama gjald sum onnur yvir 18 ár.

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at íslendska skipanin í løtuni er soleiðis, at kringvarpsgjaldið verður tikið inn um skattin, allir einstaklingar yvir 16 ár, og sum eru skattskyldugir, rinda 780 DKK um árið.

Tað er eisini ein stórur sálarligur munur á at rinda 1812,50 kr. hálva hvørt ár og so at býta upphæddina yvir 12 mánaðir. Í Danmark ber til at rinda gjaldið til DR yvir 12 mánaðir. Síðani skipanin kom í gildi, hava fleiri goldið kringvarpsgjaldið, hóast gjaldið enn verður goldið umvegis netbankan. Hetta dømi vísir munin á at rinda stórar og smáar upphæddir, hóast árliga peningaupphæddin er hin sama.

### 3.3.2 Fastur prosentpartur av inntøkuni

Ein háttur at fíggja Kringvarpið í framtíðini er, at allir persónar rinda fastan prosentpart av inntøkuni beinleiðis til Kringvarpið umvegis skattaskipanina. Við hesi skipan verður upphæddin kravd inn samstundis sum skatturin og beinleiðis til Kringvarpið. Persónar uttan a-inntøku kunnu í staðin fáa sendandi girokort frá TAKS. Her kundi verið sett eitt loft á, hvussu nógv ein persónur kann rinda. Gjaldið til ALS-skipanina, barsilsgjaldið og gjaldið til samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin verður í dag kravt inn sum fastur prosentpartur av inntøkuni.

Í løtuni rindar eitt húski við tveimum vaksnum persónum 3.625 kr. árliga í kringvarpsgjaldi. Eitt húski við tveimum persónum rindar sostatt 1.812,50 kr. fyri

hvønn árliga. Um henda skipan verður nýtt, fara persónar við høgari inntøku at gjalda meira í kringvarpsgjaldi og persónar við lágari inntøku minni. Somuleiðis fara summi húski at rinda minni enn núverandi kringvarpsgjald og onnur meira. Eftir hesum fíggingarleisti, har fastur prosentpartur av inntøkuni fer til Kringvarpið, rinda stór húski við heimabúgvandi børnum yvir 18 ár lutfalsliga nógv. Í skattaskipanini er ikki gjørligt at býta skattin upp í húski.

Verður Kringvarpið fíggjað við føstum prosentparti av persónligu inntøkuni hjá fólki, fer upphæddin, sum Kringvarpið fær á hvørjum ári, at sveiggja við búskaparligu gongdini í landinum, tí inntøkurnar hjá Kringvarpinum eru tengdar at skattagrundarlagnum. Sostatt broytir hetta ikki ynski hjá Kringvarpinum um at hava støðugar inntøkur soleiðis, at til ber at halda tær ætlanir, ið eru stungnar út í korti. Fastur prosentpartur av inntøkuni broytir tískil ikki fíggjarliga støðufestið hjá Kringvarpinum. Hinvegin fara inntøkurnar hjá Kringvarpinum at tillaga seg til búskapargongdina.

Skal Kringvarpsgjaldið á 48 mió. kr./ár inn sum prosentgjald, verður gjaldið umleið 0,75% av A-inntøkuni. Skulu uml. 6 mió. kr. til lýsingar eisini fíggjast umvegis gjaldið, verður prosentparturin umleið 0,9%. Gjaldið verður møguliga eitt vet minni, tí fólk í FAS og DIS skipanini eisini eru fevnd av gjaldinum. Hetta ger kortini ikki stóran mun.

### 3.4 MVG frítøka

Í 1993 kom Útvarpið undir MVG-skipanina. Hetta varð mett at vera tyngjandi fyri raksturin, og tí var heitt á myndugleikarnar um at avtaka kravið um rindan av meirvirðisgjaldi. Víst var til annað mentanarligt virksemi, ið var MVG-frítikið. Í dag rindar borgarin MVG av kringvarpsgjaldinum, og tí hevði eitt uppskot um at frígera kringvarpsgjaldið fyri MVG og hækka gjaldið samsvarandi givið stovninum betri fíggjarligar karmar. Fyri landskassan hevði hetta merkt færri inntøkur. Kringvarpið vísir á, at stovnurin krevur ein skatt inn fyri landið, men at MVG fer aftur í landskassan. Viðmerkjast skal, at kringvarpsgjaldið ikki er ein skattur, men eitt

avgjald fyri eina ítøkiliga tænastu, hóast flestu borgarar síggja kringvarpsgjaldið sum ein skatt.

Kringvarpsstýrið metir, at besta loysnin fyri Kringvarpið er, um kringvarpsgjaldið verður MVG-frítikið og hækkað samsvarandi. MVG-frítøkan hevði givið stovninum 10 mió. kr. í meirinntøkum um árið.

At frítaka kringvarpsgjaldið fyri MVG er ein tøkniligur spurningur. Stóri politiski spurningurin er, um Kringvarpið skal hava fleiri inntøkur enn í dag. Um eitt politiskt ynski er um hetta, skal peningurin finnast á fíggjarlógini – antin við fleiri inntøkum ella færri útreiðslum.

Tosað hevur eisini verið um at MVG-frítaka sjálvan stovnin. Mett verður, at hetta darvar gjøgnumskygninum og er kappingaravlagandi, tí stovnurin kappast við teir privatu miðlarnar á útvarps-, sjónvarps- og lýsingaøkinum.

## 3.5 Kringvarpið sum alment partafelag

Hóast privatir miðlar ofta ikki einans hava til endamáls at hava so stórt yvirskot sum gjørligt, so verður hetta ofta mett at vera teirra *raison d'être*. Hinvegin eru public service-miðlar settir til at tæna samfelagnum á ein hátt, sum lóggávan tilskilar. Hetta merkir sostatt eisini, at til ber at seta størri krøv til, hvat stovnurin skal liva upp til. Hvør skipanarformur er bestur til public service-miðilin, veldst um tey krøv, sum verða sett.

### 3.5.1 Partafeløg

Partafeløg verða vanliga stovnað til vinnuligan rakstur við vinningi fyri eyga. Eitt partafelag er ein sjálvstøðugur løgfrøðiligur persónur, sum sjálvur heftur fyri sínar skyldur. Eigararnir eru teir persónar, ið seta innskotspening í felagið (partaeigarar). Partaeigararnir býta yvirskotið í felagnum í mun til støddina á sínum pørtum í felagnum. Klárar felagið ikki sínar skyldur og fer av knóranum, missa kreditorar

felagsins sín ágóða, heilt ella partvíst. Partaeigararnir missa sítt innskot (partapeningin), men ábyrgdast ikki fyri skuldina í partafelagnum.

Partafelagslógin ásetir neyvt, hvussu eitt partafelag skal skipast, og hvørjar uppgávur og hvørja ábyrgd nevnd og stjórn hava. Partafelagið er tann mest royndi og best kendi rakstrarformurin í vinnulívinum.

Sum stýrið fyri Kringvarp Føroya hevur ført fram undir hoyringunum, kunnu tær grundleggjandi uppgávurnar hjá public service-stovninum Kringvarp Føroya tykjast at sampakka illa við tann vinnurekandi partafelagsformin fyri privatar fyritøkur; men bæði í Noregi, Svøríki og Íslandi brúka public service-støðirnar partafelagsformin sum rakstrarleist, og yvirhøvur halda tey, at tað riggar væl. Regluverkið er tó ikki eins í teimum trimum nevndu londunum.

### 3.5.2 Almenn partafeløg

Tey seinastu árini hevur tað almenna í Føroyum skipað einstakar partar av vinnuvirksemi og vinnulíknandi virksemi í sonevnd ”almenn partafeløg”. Eitt alment partafelag er ikki ein serlig løgfrøðilig allýsing. Eitt alment partafelag er eitt partafelag sum øll onnur. Tað er skipað eftir somu partafelagslóg og skal ganga undir somu reglurnar í lógini. Heitið ”alment partafelag” sigur bara, at tað er landskassin, sum er einasti partaeigari í felagnum.

P/f Atlantic Airways var stovnað í sambandi við, at tað almenna fór at reka loftferðslu. Ætlanin hevur alla tíðina verið, at hetta virksemið so líðandi skuldi fara á privatar hendur – tað er, at landskassin skuldi selja síni partabrøv.

Telefonverk Føroya Løgtings var eisini lagt í eitt partafelag. Tankin her var tann sami: Talan var um vinnuvirksemi, sum politisk semja var um so við og við at leggja út til tað privata at reka.

Ásannast má, at royndirnar við P/f Føroya Tele og P/f Atlantic Airways hava virkað væl, soleiðis at skilja, at virksemið hjá hesum partafeløgum hevur eydnast væl, og hesi feløg hava klárað seg í kappingini – upp á marknaðartreytir. Vert er tó at leggja til merkis, at bæði hesi feløg eisini hava útlendskar nevndarlimir. Orsøkina til hetta siga tey vera, at feløgini vilja hava fólk við serligum vinnulívskunnleika og –førleika til at stýra felagnum, og tað kann vera torført at finna slík í nóg stóran mun í Føroyum.

P/f Posta er seinasta royndin hjá tí almenna at leggja virksemið í partafelag. Stovnsetingin av P/f Posta ber boð um, at tann politiska skipanin hevur ta áskoðan, at P/f Posta má klára seg upp á marknaðartreytir. Undir øllum umstøðum hevur umskipanin havt við sær øgiligar broytingar og niðurlaðing av teimum traditionellu tænastunum, sum Postverk Føroya hevði um hendi. Hetta er ein avleiðing av, at P/f Posta virkar sum eitt vanligt partafelag upp á vanligar kappingartreytir. Nevndin fyri P/f Posta kann ikki taka atlit at yvirskipaðum politiskum spurningum og ynskjum frá politikarum og borgarum, um hesi ikki hava positiva fíggjarliga ávirkan á raksturin hjá felagnum. Framhaldandi undirskot og harav neyðug framhaldandi nýtekning av partapeningi úr landskassanum er í stríð við grundleggjandi kappingarreglur og sjálvan grundtankan við partafelagsmyndlinum.

Ein orsøk til, at júst tey nevndu almennu partafeløgini fyrr hava verið partur av virkseminum hjá landinum, er ivaleyst, at talan hevur verið um samfelagsliga týdningarmikið og kostnaðarmikið virksemi, sum eisini hevur havt sína tilverugrund í konsessión (serligt loyvi frá tí almenna). Nevnast kann í hesum sambandi, at øll tey trý nevndu almennu partafeløgini høvdu/hava serliga konsessiónsavtalu til ávíst virksemi, har serligar reglur galda, og har tað almenna tískil setir treytir, sum ikki galda fyri onnur partafeløg.

### 3.5.3 Noreg, Svøríki og Ísland

Í Noregi er NRK skipað sum eitt alment partafelag. Mentamálaráðharrin velur nevndarlimirnar, og nevndin setir stjóran. Mentamálaráðharrin umboðar eisini statin sum einsamallan partaeigara, og hann eigur sostatt allan avgerðarrætt á

aðalfundinum. Hóast hetta tætta tilknýtið til stjórnina, meta norðmenn sjálvir ikki, at hetta er ein trupulleiki, og teir halda eisini sjálvir, at hetta skapar nóg langa ”armslongd” til ta politisku skipanina. Í Noregi er eisini ein kringvarpslóg, sum justerar nøkur ávís viðurskifti, m.a. ásetir kringvarpslógin, at tað er programmleiðarin, sum hevur ábyrgdina av programmrakstrinum og ikki partafelagsnevndin, sum tað annars hevði verið eftir partafelagslógini.

Norðmenn halda hesa skipan rigga væl í tí dagliga, men at hon krevur nevndarlimir við professionellum førleikum, tí NRK skal kappast innan fyri karmarnar av einum dynamiskum marknaði.

Svøríki hevur eina skipan, har tær almennu public service-støðirnar verða riknar sum partafeløg. Einsamallur partaeigari í øllum feløgunum er ein grunnur/sjálveigandi stovnur, sum staturin hevur sett á stovn. Staturin velur stýrið fyri grunnin eftir reglum, sum líkjast okkara kringvarpslóg – t.e. at teir politisku flokkarnir eru umboðaðir, og at stýrið hevur ein meira yvirskipaðan leiklut átøkt yvirskipaða leiklutinum hjá okkara kringvarpsstýri. Stýrið fyri grunnin velur nevndarlimirnar í partafeløgunum, sum reka støðirnar. Hesir verða eins og í Noregi valdir eftir fakligum førleika og royndum, og eisini sviar meta, at hetta nevndararbeiðið setir serliga stór krøv.

Í Svøríki verður nú eisini tosað um at leggja uppaftur størri leiðslu- og virkisábyrgd fyri public service-skyldunum út til stovnsleiðslurnar sjálvar.

Sviar halda, at hetta er besta loysnin at skapa ”armslongd” til ta politisku skipanina, og at partafelagsformurin er góður sum dagligt arbeiðsamboð, tí hann er væl kendur.

Í Íslandi er almenni kringvarpsraksturin í dag í høvuðsheitum skipaður á tann hátt, at tey hava eina kringvarpslóg, sum fevnir um almenna loyvi at senda útvarp/sjónvarp, skyldur, inntøkur, lýsingar, atgongd til almenn fjarskiftisnet, avmarkingar í einkarrætti, ábyrgd av sendingum osfr. Umframt hesa lóg er eisini ein onnur lóg

galdandi fyri P/f Ríkisútvarpið, sum er lóg um almenna partafelagið Ríkisútvarpið (RUV), sum íslendska ríkið eigur.

Almenna partafelagið RÚV verður stjórnað av eini 5-mannanevnd, sum politisku flokkarnir á Altingi tilnevna, og sum Altingið velur. Nevndin setir stjóran, sum skal tryggja, at útvarpið verður rikið sambært galdandi lóg fyri partafelagið og sambært galdandi public service-sáttmála millum felagið og íslendska mentamálaráðið.

Síðan almenna ríkisútvarpið varð umskipað til partafelag, er starvsfólkatalið minkað við uml. einum triðingi, t.e. úr uml. 300 niður í 200 starvsfólk. Deildir eru lagdar saman, færri og færri uppgávur verða keyptar uttanhýsis. Umskipanin gjørdi, at útreiðslurnar lækkaðu, og starvsfólkini, sum eftir vóru, skuldu renna skjótari.
Sambært ársfrágreiðingunum hjá RÚV 2009-2010 er álitið á útvarps- og sjónvarpsstøðina vaksið hesi 3 síðstu árini, síðan stovnurin var umskipaður til alment partafelag, og fíggjarárið 2010 gav kringvarpsstøðin uml. 10 mió. fø. kr. í avlopi. At tað innihaldsliga eisini hevur verið á einari leið, vísir tann sannroynd, at stovnurin seinasta árið hevur fingið fleiri virðislønir fyri góðar sendingar.

### 3.5.4 Kringvarpsmyndilin

Formliga eru ongar forðingar fyri at skipa Kringvarp Føroya sum partafelag. Mest hugsandi er, at húsognirnar hjá stovninum, útgerð og møgulig onnur aktiv vórðu skotin inn sum apportinnskot til partapening hjá landskassanum. Nærliggjandi hevði verið at valt kringvarpsnevndina sum nevnd fyri P/f Kringvarp Føroya, men her skal havast í huga tær metingar, sum norðmenn, sviar og eisini P/f Føroya Tele og P/f Atlantic Airways hava gjørt, um, at neyðugt er við nevndarlimum við professionellum førleikum. P/f Kringvarp Føroya hevði ikki í minni mun enn hini føroysku almennu partafeløgini havt tørv á kønari leiðslu – nevndarlimum, sum ikki bert kenna og duga at arbeiða eftir partafelagslógini sum vinnulívsfólk, men sum eisini hava kunnleika til tað serliga slagið av virksemi, sum Kringvarpið rekur. At gera sum Føroya Tele og Atlantic Airways og fara uttanlands at leita sær styrk til hesar nevndarsessir, tykist at sampakka illa við ta serligu støðu, Kringvarpið hevur sum ein av Føroya fremstu

mentanarberum. Eitt annað trupult atlit er tað málsliga. Nevndin í einum miðlastovni má sum minsta mark skilja málið í miðlunum.

Verður Kringvarp Føroya umskipað til eitt partafelag, er ivaleyst eisini neyðugt at gera broytingar í kringvarpslógini fyri at gera nakrar serreglur, sum víkja frá høvuðsreglum í partafelagslógini. Hetta er hinvegin ikki ókent. Løgtingið hevur t.d. við lóg stovnað smápartafelagið Sp/f Ítróttarvedding. Í hesi lóg eru serligar ásetingar, sum víkja frá reglum í smápartafelagslógini. Soleiðis ber til at velja tann best hóskandi tillagaða felagsformin til tær serligu uppgávurnar og endamálið hjá felagnum.

Við umskipan til partafelag høvdu ávís rættarlig viðurskifti tó broytst av sær sjálvum. Millum annað kunnu nevnast:

At fyrisitingarlógin ikki var galdandi longur fyri fyrisiting Kringvarpsins. Tað merkir, at hvørki borgarar ella onnur høvdu longur havt møguleika at biðja um alment innlit ella at klaga Kringvarp Føroya til Løgtingsins Umboðsmann. Tað hevði eisini havt við sær, at tær fyrisitingarligu reglurnar í starvsfólkamálum ikki longur vóru galdandi. Í so máta hevði tað stillað leiðsluna hjá stovninum nakað fríari.

At sáttmálin millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið um lønar- og setanartreytir hjá starvsfólkunum hevði ikki longur verið galdandi. Nýggjur sáttmáli hevði ivaleyst verið gjørdur millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið og/ella Føroysk Miðlafólk. Illa ber til at hugsa sær, at slíkur sáttmáli slapp Kringvarpinum bíligari enn í dag
At P/f Kringvarp Føroya við fullari megi hevði kunnað tikið kappingina upp við hinar miðlarnar á lýsingamarknaðinum, eisini á netsíðuni hjá stovninum.

At P/F Kringvarp Føroya hevði komið undir vanliga skattaskyldu og MVG-skráseting.

Í allar mátar hevði P/f Kringvarp Føroya løgfrøðiliga verið privatrættarliga regulerað og ikki almentrættarliga. Til ber at regulera øll hesi viðurskifti við fráviki í

kringvarpslógini, men so er spurningurin, hvussu nógv er eftir av partafelagsforminum, og hvørji argument so skulu vera fyri at brúka hesa skipan.

Varð Kringvarp Føroya skipað sum partafelag, er hugsandi, at vanligur kappingarhugburður hevði gjørt, at aðrir (privatir) miðlar betur høvdu kunnað sett fram krav um at fáa public service-sáttmála og harvið fígging frá tí almenna.

Ein av fíggjarligu orsøkunum til, at eitt alment kringvarp er til, er, at tilfar sum hevur samfelagsligan áhuga, men sum marknaðurin ikki eftirspyr, verður gjørt. Public service-stovnurin kann veita hetta innihald við sosialum og mentanarligum fyrimunum fyri samfelagið, sum annars ikki hevði verið framleitt, tí peningaligt grundarlag ikki hevði verið fyri innihaldinum. Ein public service-miðil hevur serlig krøv, ið aðrir miðlar ikki hava skyldu at fylgja. Henda skyldan sæst aftur í programmútboðnum. Hetta merkir millum annað, at fjølbroytni í innihaldinum og dýpdin av evnunum, ið verða viðgjørd, skulu venda sær til føroyingar sum samfelagsborgarar og ikki bara sum forbrúkarar.

Sjónvarpið og Útvarpið hjá Kringvarpinum framleiða í dag tilfar, sum ikki hevði verið eftirspurningur eftir á fría marknaðinum, men sum verður mett at hava góða ávirkan á samfelagið. Eitt nú sendir Kringvarpið nýggjárskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri á hvørjum ári. Framleiðslan er dýr, men tað verður mett at hava góð árin á føroyska samfelagið. Um Kringvarpið varð skipað sum alment partafelag, hevði henda grundleggjandi uppgávan hjá stovninum møguliga dottið burtur. Hetta hevði givið Kringvarpinum fríari teymar viðvíkjandi innihaldinum og vali og viðgerð av evnum. Kringvarpið hevur undir hoyringunum víst á, at sjálvsfatanin hjá stovninum og starvsfólkunum ikki hevði verið hin sama.

Privatu miðlarnir hava eisini víst hesum uppskoti aftur, bæði tí Kringvarpið hevði kappast enn meira við hinar miðlarnar um avmarkaðu lýsingainntøkurnar, men eisini tí privatu miðlarnir ynskja ein almennan public service-stovn, sum nøktar og fyllir út grundleggjandi fólkaræðisliga tørvin. Kringvarpið metir harafturat, at stovnurin er við til at fáa samfelagið at hanga saman og ivast í, um Kringvarpið hevði havt sama

savnandi leiklut, um stovnurin varð eitt alment partafelag. Undir hoyringunum hevur stovnurin millum annað lýst sín leiklut sum *eina dagbók hjá føroyska samfelagnum*. Haraftrat er uppgávan hjá einum public service-stovni vanliga eisini at vera ein savnandi megi í samfelagnum. Føroya Blaðútgevarafelag og Føroysk Miðlafólk vísa eisini á, at Kringvarpið hevur nakrar serstakar skyldur viðvíkjandi uppgávuni sum mentanarberi. Uppgávur sum Posta og onnur almenn partafeløg ikki hava.

### 3.5.5 Sjálvsognarstovnur

Ein møguleiki at sleppa undan vinnings- og kappingarmomentinum í partafelagslógini er at skipa Kringvarpið sum ein grunn ella sjálvsognarstovn uttan fyri almenna økið. Tað kann gerast við, at landið setir aktivini hjá Kringvarpinum inn sum grundfæ og ger viðtøkur. Í viðtøkunum høvdu so verið møguleikar at seta upp serreglur, sum í dag partvís standa í kringvarpslógini. Stovnurin hevði so havt eitt stýri, sum setti stjóra. Í viðtøkunum kundu avmarkandi reglur verið settar inn fyri kapping við tann privata lýsingamarknaðin. Ein skipan við sjálveigandi stovni hevði møguliga havt við sær eina minni handilsliga sjálvsfatan enn partafelagsformurin, og møguleiki varð eisini at geva stýrinum eina minni ábyrgd enn partafelagsnevndini – t.e. nøkulunda sum tað er í dag undir galdandi kringvarpslóg.

Eitt partafelag er bara ein skipanarformur. Týdningarmikið er at gera sær greitt, at umskipan til partafelag, grunn, sjálvsognarstovn, ella hvør loysn verður vald, loysir ikki í sær sjálvum nakrar fíggjarligar ella journalistiskar trupulleikar hjá Kringvarpi Føroya.

Arbeiðsbólkurin sær ikki nakrar eyðsýndar ella avgerandi fyrimunir við einari skipan fram um aðra, og tí ber illa til at viðmæla aðra skipan.

## *3.6 Um støðan ikki broytist*

Alsamt færri inntøkur til framleiðslu av miðlatilfari er ikki eitt føroyskt rák burturav. Gongdin er hin sama í øðrum londum – fíggjarliga grundarlagið hjá miðlunum viknar. Minni peningur til innihald merkir í longdini verri tíðindaflutning. Støðan er kortini

serlig í Føroyum, tí lønin til tíðindafólk er munandi lægri samanborið við hini Norðurlondini. Eitt nú fóru starvsfólkini á Dimmalætting og Sosialinum 10% niður í løn í 2010. Føroysk Miðlafólk vísa eisini á, at tess meiri miðlarnir verða niðurpíndir fíggjarliga, minni verður skottið millum tíðindaflutningin og lýsararnar, og tí verður eisini torførari at veita Føroya fólki sakligan og óheftan tíðindaflutning. Í Kringvarpinum er støðan heldur ikki góð. Tíðindafólkini fáa minni í løn í Kringvarpinum enn um tey arbeiddu aðrastaðni í almenna geiranum ella á privata arbeiðsmarknaðinum. Kringvarpið metir sjálvt, at tey, ið arbeiða við tíðindaflutningi í Føroyum, gera tað fyrst og fremst av hugsjónarligum ávum. Grundleggjandi hugsanin við tíðindaflutningi er, at tíðindi ikki bara eru viðkomandi fyri tíðindafólk, men fyri øll. Tí metir Kringvarpið, at tíðin er komin til, at stovnurin fær meira pening at arbeiða við. Góður tíðindaflutningur gevur samfelagnum kunning og meiningar, sum eitt vælvirkandi fólkaræði er treytað av. Góður tíðindaflutningur merkir eisini, at stórur partur av tíðindunum í miðlunum skal vera eginframleiðsla. Í hesum sambandi vísir Miðlahúsið á, at starvsfólkini í Kringvarpinum alt ov ofta lesa tíðindi beinleiðis av portal.fo í tíðindasendingunum hjá Kringvarpinum. Hetta er serliga galdandi í vikuskiftunum. Spurningurin er, um hetta skal skiljast sum, at stovnurin ikki hevur fíggjarliga orku til at veita Føroya fólki nóg nógv eginframleidd tíðindi um vikuskiftið.

Nógvir hoyringarpartar sakna eina veruliga støðutakan til, hvat Kringvarpið skal vera. Og tí hevur tað alstóran týdning, at framtíðin hjá føroyskum miðlum verður viðgjørd, soleiðis at miðlunum verður lív lagað. Her verður serliga hugsað um at lóggeva um yvirskipaðu treytirnar, sum miðlarnir skulu halda seg til. Umráðandi er at hyggja eftir samlaðu miðlamyndini, tá avgerðir verða tiknar, tí allar avgerðir viðvíkjandi eitt nú Kringvarpi Føroya ávirka hinar miðlarnar. Fleiri hoyringarpartar eftirlýsa greið viðurskifti fyri bæði privatar miðlar og Kringvarpið.

Myndin niðanfyri vísir, hvørji yvirskipað viðurskifti ávirka miðlarnar. Yvirskipaðu frábrigdini hava ávirkan á hvørt annað, altso ávirkar eitt nú politikkur búskapin og vice versa. Í arbeiðinum at framtíðartryggja føroyskar miðlar er serliga politiska skipanin og hennara leiklutur viðkomandi, tí politiskar avgerðir hava beinleiðis ávirkan á miðlarnar. Myndin gevur innlit í, hvørji viðurskifti politiska skipanin skal

hugsa um, tá avgerðir um føroyskan miðlapolitikk verða tiknar. Fyrst og fremst skal kortini dentur leggjast á, at politikarar hava størstu ávirkanina á, hvussu miðlarnir síggja út í framtíðini.




(McQuail, 2010: 219)

# 4 Privatir miðlar í Føroyum

Privatu miðlunum er ikki álagt at røkja ávísar skyldur, sum í lóggávuni er álagt Kringvarpinum. Hetta er ein grundleggjandi munur millum almenna Kringvarpið og miðlarnar, ið virka á handilsligum grundarlagi. Kringvarpið gevur privatu miðlunum góða kapping á innihaldsliga økinum, hetta eru privatu miðlarnir samdir um, men trupulleikin er, at Kringvarpið eisini gevur privatu miðlunum ringa kapping, tí sjálvstøðugi almenni stovnurin fær umleið 6 mió. kr. í lýsingainntøkum um árið.

Korini hjá privatu miðlunum eru ikki góð, tí er umráðandi at hyggja eftir, hvussu støðan kann broytast, so bæði privatir miðlar og Kringvarpið miðla dygdargott innihald. Givið er, at uttan privatu miðlarnar var Kringvarpið ikki á sama støði sum í dag, og leikluturin hjá stovninum var ein annar.

## *4.1 Privata miðlaskipanin í Føroyum*

Tað hava verið nógvar fíggjarligar rembingar hjá privatu miðlunum seinastu árini. Fíggjarkreppan hevur ávirkað raksturin hjá øllum miðlunum, sum hava lýsingainntøkur sum part av tilverugrundarlagnum. Harafturat hava tøknilig frambrot eisini stóra ávirkan á miðlarnar. Stóra samrøðuevnið hjá privatu miðlunum er kappingin frá Kringvarpinum á lýsingaøkinum. Í øðrum londum finnast privatir miðlar nógv at støðuni hjá kringvørpum á alnetinum. Í Føroyum er Kringvarpið eisini til staðar á netinum, men hetta tykist ikki darva privatu miðlunum – so leingi Kringvarpið ikki lýsir á kringvarp.fo.

Hóast flestu privatu miðlarnir í Føroyum liva av at selja miðlainnihald og lýsingar og sostatt eru tætt knýttir at marknaðinum, so eru miðlarnir ikki bara vanligar fyritøkur, ið bara ávirkast av marknaðinum. Miðlarnir eru eisini mentanarligir og sosialir stovnar, sum geva almenninginum og samfelagnum sum heild eitt virði.

### 4.1.1 Bløð

Søguliga hava bløðini í Føroyum havt stóran týdning fyri samfelagsligu menningina síðani seinast í 19. øld. Fyrstu nógvu árini vóru bløðini tengd at politiskum flokkum og ávísum politiskum hugsjónum. Bløðini eru færri í tali í dag, men hava tey meira ella minni slitið seg frá tilknýtinum til ávísar politiskar flokkar. Í dag eru tvey bløð eftir í Føroyum, ið koma út fleiri ferðir um vikuna. Dimmalætting kemur fimm ferðir og Sosialurin tríggjar ferðir. Haraftrat eru nøkur smærri bløð, harav nøkur eru ókeypis. Stóru bløðini hava nógv at dragast við, og bæði Dimmalætting og Sosialurin høvdu undirskot í 2010. Serliga alnetið hevur broytt støðuna hjá bløðunum. Framleiðslan er broytt, og útreiðslurnar til útbýting eru so at siga ongar, tí tilfarið er talgilt.

Bløðini hava altíð verið í kapping við nýggjar miðlar, sum hava tikið seg fram. Broytingar hava tískil verið natúrligur partur av tilverugrundarlagnum hjá bløðunum. Bløðini hava støðugt tillagað rakstur og innihald til ein nýggjan veruleika. Í løtuni eru trý eyðsýnd rák, ið hava stóra ávirkan á fíggjarligu støðuna hjá bløðunum.

- Haldaratalið er lækkandi
- Lýsingainntøkurnar eru minkandi
- Stórar tøkniligar menningar

Áhugin fyri pappírsblaðnum er fallandi um allan heim. Broytingin kemst fyrst og fremst av stórari kapping frá alnetinum. Hesin nýggi miðilin hevur skapt stórar avbjóðingar fyri eldri miðlar. Tøkniliga menningin og broytt brúkaramynstur merkja, at serliga fíggjarliga grundarlagið undir eldri miðlunum er nógv broytt, tí stórur partur av innihaldinum er til taks ókeypis á netinum. Harafturat fer ein vaksandi partur av lýsingakrónunum frá eldri miðlum til alnetið. Kappingin um lýsingakrónurnar hevur ongantíð verið størri. Hesa gongd merkja føroysku bløðini serliga væl. Eitt nú hava ókeypis vikubløð trýst prísin á lýsingum niður, og hetta ávirkar inntøkugrundarlagið hjá stóru bløðunum.

Um hugt verður at brúkaramynstrinum, so eru tað serliga tey ungu, ið ikki halda bløð. Hesin aldursbólkur nýtir harafturímóti nógva tíð á netinum. Hetta merkir, at

yngra ættarliðið veksur upp uttan serligt tilknýti til blaðmiðilin. Ein stór avbjóðing hjá bløðunum er tí at skapa ein tørv hjá hesum bólki, sum ikki áður hevur mett pappírsblaðið vera umráðandi partur av gerandisdegnum.

Nógv hevur verið tosað um, at blaðið sum miðil fer at doyggja. Hetta er ikki sannlíkt, tí eldri miðlar hvørva vanliga ikki, tá nýggir miðlar taka seg fram. Hinvegin broytist innihaldið munandi, tí nýggir miðlar geva nýggjar møguleikar. Hóast bløðini eru partur av gerandisdegnum hjá nógvum føroyingum í framtíðini, so bendir nógv á, at inntøkurnar ikki fara at vaksa. Tí er spurningurin um miðlastuðul viðkomandi í Føroyum. Hesin spurningur verður viðgjørdur í 4.4. Her er umráðandi at leggja dent á, at miðlastuðul ikki verður givin av vinnupolitiskum ávum, men av fólkaræðisligum ávum. Bløðini fáa í dag óbeinleiðis stuðul, tí tey eru MVG-frítikin. Miðlahúsið vísir á, at bløðini, ið Sosialurin gevur út mánadag og mikudag, geva undirskot. Verður gongdin ikki vend, kemur Sosialurin væntandi bert út einaferð um vikuna í framtíðini.

Føroya Blaðútgevarafelag vísir eisini á, at lýsingainntøkurnar hjá Kringvarpinum gera, at bløðini hava færri inntøkur. Samstundis ásannar felagið, at um Kringvarpið ikki lýsti, so var allur peningurin ikki farin til bløðini. Felagið metir, at eini 25% av lýsingainntøkunum hjá Kringvarpinum fara til bløðini, um Kringvarpið steðgar lýsingavirkseminum. Felagið hjá føroyskum samskiftisvirkjum, Samskifti, vísir á, at ringa fíggjarliga støðan hjá bløðunum er sjálvskapt, og at tað tí ikki er rætt, at Kringvarpið ger støðuna hjá bløðunum so nógv verri. Ein høvuðsorsøk til vánaligu gongdina hjá bløðunum er, sambært Samskifti, at bløðini hava kappast innanhýsis um lýsarar seinastu árini, og at prísurin á lýsingum eftirfylgjandi er farin nógv niður.

### 4.1.2 Útvarpsstøðir

Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya høvdu einkarætt at varpa loftborið miðlatilfar til 1. mars 1998. Avtøkan av einkarættinum merkti, at onnur fingu møguleika at varpa útvarp og sjónvarp. Tá fyrsta privata útvarpsstøðin í Føroyum, Atlantic Radio, fór at senda í mai 1999 breyt støðin 42 ára gamla einkarættin hjá Útvarpi Føroya. Støðin sendi einans í eitt hálvt ár. Útgerðin varð keypt av øðrum, og í desember 1999

byrjaði Rás2 at senda útvarp. Kristiliga útvarpsrásin, Lindin, fór at senda í januar 2000. Hesar støðirnar eru framhaldandi einastu privatu útvarpsstøðirnar í Føroyum. Lindin hevur, síðani hon byrjaði at senda, verið fíggjað við stuðli frá einstaklingum og virkjum. Hinvegin hevur Rás2 fyrst og fremst livað av lýsingainntøkum. Støðin er nógv broytt, síðani hon byrjaði. Rás2 hevur millum annað fingið nýggjar eigarar. Góðskan á sendingunum er nógv hækkað og somuleiðis nøgdin av tilfari. Hetta hevur eisini gjørt rásina dýrari at reka. Miðlahúsið, sum í dag eigur Rás2, hevur tískil stóran áhuga í, at Kringvarpið missir lýsingainntøkurnar. Rás2 er einasti veruligi kappingarneyti hjá almennna Kringvarpinum, men kappingin frá Kringvarpinum um avmarkaðu lýsingakrónurnar hjá fyritøkum og øðrum stovnum merkir, at Rás2 í dag missir kundar til Kringvarpið. Dømi eru um, at lýsarar eru farnir frá Rás2 til Kringvarpið, millum annað tí almenni stovnurin hevur bjóðað annan prís. Miðlahúsið hevur undir hoyringunum víst á skeivleikan á marknaðinum, tá Kringvarpið verður fíggjað partvíst við lýsingum.

Munur er eisini á, hvussu sendinetini hjá almennu og privatu loftbornu miðlunum er fíggjað. Mentamálaráðið rindar fyri sendinetið hjá Kringvarpinum, meðan Miðlahúsið rindar áleið 60.000 kr. um mánaðin fyri viðlíkahald av 21 sendarum, sum gera tað gjørligt hjá fólki at hoyra Rás2.

### 4.1.3 Portalar

Kappingin á alnetinum í Føroyum víkir nógv frá støðuni í hinum vesturlendsku londunum. Í Føroyum er almenna partafelagið, Føroya Tele, nærum einaráðandi við føroyskum tænastum og tíðindum á netinum. Sambært gallup.fo eru 8 út av 10 teimum mest vitjaðu síðunum í Føroyum ogn hjá Føroya Tele. Allar føroyskar netsíður eru ikki við í uppgerðini, men hon gevur kortini eina góða mynd av serligu støðuni í Føroyum.

Tá alnetið fekk stóra útbreiðslu, royndu nógvar telefyritøkur at gera tíðindaportalar. Men fyritøkurnar ásannaðu, at tað er munur á telesamskifti/tænastuveitingum og tíðindaframleiðslu. Tí eiga telefyritøkur í øðrum londum ikki tíðindaportalar. Í

Føroyum er støðan ein onnur. Nógv mest vitjaði portalurin í Føroyum er portal.fo, ið Føroya Tele eigur. Við 77.000 túsund vitjandi brúkarum um vikuna (juli, 2011) er portal.fo 57.000 túsund vitjanir frammanfyri næstmest vitjaðu føroysku netsíðuna, sportal.fo, sum Føroya Tele eisini eigur. Føroya Tele er ein stórur kappingarneyti hjá øðrum á netinum. Støddin á teirra virksemi ger tað ómetaliga trupult hjá øðrum at framleiða tilfar til netið og fáa inntøkur fyri arbeiðið. Metast má, at nettíðindaflutningurin í Føroyum hevði verið fjølbroyttari, um kappingin við aðrar portalar var meira javnbjóðis. Tá hevði borið til hjá øðrum at fingið fleiri lýsingainntøkur og harvið meira pening til tíðindaframleiðslu.

Í løtuni hevur Sosialurin avtalu við Føroya Tele um at framleiða tilfar til portal.fo. Hetta hevur Sosialurin gjørt síðani mai 2000. Sosialurin hevur eisini egna netsíðu. Aðrar netsíður við fitt av vitjandi eru nordlysid.fo, dimma.fo, kvf.fo og vagaportal.fo. Í 2010 fingu portalarnir hjá Føroya Tele 3,1 mió. kr. inn í lýsingainntøkum samanborið við 1,6 mió. kr. árið fyri. Umframt lýsingainntøkur frá portalum fær Føroya Tele lýsingainntøkur frá telefonbókini. Gulu síðurnar hava síðani 2007 árliga givið Føroya Tele millum 3,3-4,4 mió. kr. í lýsingainntøkum.

### 4.1.4 Sjónvarp

Smápartafelagið R2 Net hevur seinastu árini sett upp egið sendinet, sum røkkur oman fyri 60% av øllum føroyingum. Á sendinetinum er rúm fyri einari analogari rás og seks talgildum rásum. Í løtuni senda tvær føroyskar rásir. Kristiliga rásin Iktus sendir umleið tríggjar tímar av føroyskum tilfari um vikuna og 10'arin, ið ikki sendir regluliga. Iktus verður send bæði analogt og talgilt. Eisini eru tvær útlendskar rásir í netinum. Harafturat hevur Televarpið rásina, Rás 1, ið millum annað hevur varpað sendingarnar hjá SV1.

Iktus og 10'arin meta, at tað er umráðandi við kapping á sjónvarpsøkinum, ið gevur fólkinum fleiri føroyskar valmøguleikar, og sum ger sjónvarpið hjá Kringvarpinum betri. Rásirnar vísa harafturat á, at tær í longdini fara at megna at kappast við sjónvarpið hjá Kringvarpinum. Iktus er fíggjað við privatum peningastuðli, hinvegin

hevur 10'arin áhuga í at senda sjónvarpslýsingar, men rásin metir, at lýsingainntøkurnar í Kringvarpinum gera støðuna trupla, tí rásin ikki fær inntøkur til at senda sendingar á føroyskum. Rásirnar ynskja eitt gott Kringvarp, sum ger sendingar til allar føroyingar, men høvuðstrupulleikin hjá nýggjum føroyskum sjónvarpsrásum er, sambært R2 Net, at Kringvarpið vinnur pening við lýsingavirksemi. Rásirnar høvdu lagt meira fyri, um Kringvarpið ikki hevði lýsingainntøkur. Felagið sær ongan trupulleika í, at Kringvarpið varðveitir møguleikan at senda V4, Gekkin og kunngerðir.

Rásirnar halda, at Kringvarpið ikki ger nóg nógv tilfar fyri peningin, ið stovnurin fær. Rásirnar skjóta upp, at Kringvarpið nýtir 10% av inntøkunum til framleiðslu av bíligum sendingum, so talið av sjónvarpstímum veksur. Aðrir hoyringarpartar hava eisini givið til kennar, at Kringvarpið ikki nýtir peningin á fullgóðan hátt, og at størri partur av virkseminum hjá Kringvarpinum skal bjóðast út uttan fyri stovnin bæði fyri at gera Kringvarpið virknari, og fyri at geva øðrum miðlum lættari atgongd til sendiskránna hjá stovninum.

## *4.2 Útberingarstuðul*

Størstu inntøkurnar hjá bløðunum eru søla av bløðum og lýsingum. Vanliga verður mett, at tess størri partur av samlaðu inntøkunum hjá bløðunum kemur frá lýsingum, tess veikari er markið millum áhugamálini hjá lýsarunum og redaktionella innihaldið í bløðunum. Harafturat eru bløð, hvørs inntøkur í stóran mun stava frá lýsingum, viðbreknari, tá tað gongur illa fíggjarliga í samfelagnum. Stóru føroysku bløðini hava seinastu árini merkt stóra kapping frá ókeypis bløðum og tíðindaportalum á netinum, sum øll bjóða tíðindi ókeypis. Gongdin merkir, at bløðini hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman. Stóru føroysku bløðini meta, at Føroyar sum samfelag grundleggjandi hevur brúk fyri bløðunum. Ikki so nógv av søguligum ávum, men tí bløðini hava ein umráðandi fólkaræðisligan leiklut. Kanningar vísa (Lund: 2009), at stórur partur av tíðindunum verða framleidd í bløðunum og verða síðani borin víðari av øðrum miðlum. Hetta merkir, at í øðrum londum hava bløðini ein umráðandi

leiklut í tíðindaføðiketuni. Tó eru ongar kannningar gjørdar í Føroyum, ið vísa, um sama er galdandi her.

Ein háttur at geva bløðunum betri fíggjarligt grundarlag er at veita bløðunum útberingarstuðul. Føroya Blaðútgevarafelag nevnir útberingarstuðul sum eina loysn fyri at varðveita bløðini í framtíðini. Her skal havast í huga, at miðlarnir áhaldandi tvinna saman ymiskar miðlar í teirra útboði, og stuðul til ein ávísan part av miðlunum hevur ávirkan á kappingarfyritreytirnar hjá øðrum miðlum. Eitt nú hava føroysku bløðini netsíður, ið verða dagførdar regluliga. Fáa bløðini stuðul, skapar hetta ójavna kapping við aðrar netsíður, ið ikki geva út bløð. Spurningurin um útberingarstuðul til bløðini elvir eisini til aðrar spurningar, eitt nú um annað prent skal takast við í eina stuðulsskipan. Hetta kundi eitt nú verið viðkomandi hjá blaðnum Kvinna, ið kemur út 8 ferðir um árið.

Føroya Blaðútgevarafelag hevur víst á, at tað er sera kostnaðarmikið at bera bløðini út. Prísurin er áleið 3 kr. fyri hvørt blaðið. Hesar útreiðslur hava netmiðlarnir so at siga ikki. Netmiðlarnir hava útreiðslur til støðuga menning av síðum og tænastum, men útreiðslurnar eru væl lægri enn eitt nú kostnaðurin at bera bløðini út til lesararnar.

Blaðútberingarstuðul verður eitt nú givin í Norra og Danmark. Danski stuðulin er árliga 350 mió. kr. Tað er danska Mentamálaráðið, ið gevur eina ávísa upphædd til hvørt blað, ið verður borið út. Í Danmark verður stuðul givin til fyrstu 24.000 eintøkini av einum blaði. Haraftrat verða krøv sett, áðrenn stuðul verður givin. Fyri at skilmarka seg sum blað, skal blaðið koma út í øllum førum 5 ferðir um vikuna. Weekendavisen verður kortini stuðlað, sjálvt um blaðið kemur út eina ferð um vikuna. Í Norra er stuðulin ikki tengdur at títtføri av blaðútgávum. Harafturat skal miðilin vera samfelagslýsandi, hava innihald um politikk, mentan og kjak. Eginframleiðslan í blaðnum skal eisini vera oman fyri 33%, og oman fyri 50% av tilfarinum skal vera redaktionelt viðgjørt. Stuðulin verður fyrst og fremst veittur fyri at hava meira fjølbroytni í miðlunum og fyri at styrkja nærsamræðið í samfelagnum. Mett verður eisini, at í smáum samfeløgum er neyðugt við blaðstuðli fyri at geva

størri margfeldi – ikki minst í politiska orðaskiftinum. Miðlarnir hava ymiskar tilgongdir, og tí er eitt niðara mark, áðrenn ov fáar røddir koma til orðana í almenna rúminum.

Útberingarstuðulin er eitt nú avgerandi fyri danska Kristeligt Dagblad, ið ikki varð givið út, um bløðini vóru stuðulsskipanina fyriuttan. Sambært Kristeligt Dagblad er styrkin hjá bløðunum millum annað, at miðilin hevur eina støðuga samrøðu við lesararnar og skapar eitt rúm til orðaskifti, sum alnetið ikki megnar á sama hátt. Styrkin er eisini, at uppsetanin er greið og einføld og innihaldið ritstjórnað. Summi grundgeva ímóti útberingarstuðli, tí bløðini tá verða tengd fíggjarliga at politisku skipanini, sum bløðini skulu viðgera óheft og eisini kunna finnast at. Meinbogin við hesi loysnini kann vera, at bløðini skjótt verða tengd at stuðlinum og ikki kunnu virka uttan.

Støðuga samantvinnanin av ymiskum miðlum, serliga orsakað av alnetinum, talar ímóti serligum stuðli til bløðini, tí miðlarnir ikki verða viðgjørdir eins, tá ein miðil verður tikin framum aðrar. Hetta kann hava kappingaravlagandi fylgjur.

Við støði í lýsingini av stuðli til bløðini, metir arbeiðsbólkurin ikki, at útberingarstuðul er rætta loysnin. Miðlarnir verða ikki viðgjørdir eins, tá ein miðil verður tikin framum aðrar. Hetta kann hava kappingaravlagandi fylgjur. Verður stuðulin givin, er ómetaliga trupult at liva uttan hann. Hetta ger eisini, at bløðini verða meira viðbrekin mótvegis politisku skipanini, ið til eina og hvørja tíð kann strika stuðulin.

# 5 Miðlagrunnur

Lýsingamarknaðurin í Føroyum er lítil og avmarkaður. Samstundis er sjónvarpið hjá Kringvarpinum einasti pallur, har lýsarar kunnu náa eini stórari føroyskari hyggjarafjøld við sjónvarpslýsingum. Henda sannroynd ger, at fyritøkur nýta pening til lýsingar í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum. Hesin peningur er í síðsta enda við til at fíggja føroyskt miðlatilfar, sum annars ikki varð framleitt. Hetta er í sær sjálvum

gagnligt, men verandi skipan darvar privatu miðlunum. Samstundis er Kringvarpið tengt at lýsingapeningi.

Her verður hugt nærri eftir, hvussu broytingar kunnu fremjast.

Serliga lýsingafyritøkurnar hava eitt ynski um at varðveita møguleikan at senda lýsingar. Aðrir hoyringarpartar hava eisini víst á, at Kringvarpið ikki skal missa møguleikan at lýsa í sjónvarpinum, tí hetta er einasti pallur hjá brúkarunum at síggja livandi lýsingar á móðurmálinum. Í hesum viðfangi kann nevnast, at sama grundgeving verður nýtt í Spania um katalansku public service-støðina TVC, og rætt hennara at varpa lýsingar (Moring & Godenhjelm: 2011). Lýsingar í livandi myndum síggjast eisini á netinum, men upplivingin hjá brúkarunum er ikki hin sama, og hjá framleiðarunum av livandi lýsingum gevur netið ikki sama fíggjarliga avkast.

Um lýsingar í sjónvarpinum verða avtiknar, hvørvur sjónvarpslýsingavinnan í Føroyum væntandi eisini. Fyritøkur flyta peningin til lýsingar har, ið ávísir bólkar í samfelagnum eru virknir. Lýsararnir fara har, ið brúkararnir eru. Hetta er eisini ein av orsøkunum til, at lýsingavinnan vil varðveita sjónvarpslýsingar í Kringvarpinum. Lýsingafyritøkurnar meta ikki, at ein onnur føroysk sjónvarpsrás fær nógmikið av hyggjarum til, at tað verður peningaliga áhugavert hjá fyritøkum at lýsa á rásini.

Við verandi skipan fær Kringvarpið allar inntøkurnar fyri lýsingar í sjónvarpinum. Hetta hevur keðilig árin á bæði privatu og almennu miðlarnar. Serliga miðlarnir, sum virka á handilsligum grundarlagi, meta, at verandi lýsingainntøkur hjá Kringvarpinum eru kappingaravlagandi. Harafturat mugu handilslýsingar í Kringvarpinum eisini metast at geva trupulleikar við óheftni hjá sjónvarpinum, hóast Kringvarpið ikki metir, at verandi fígging darvar óheftnið hjá stovninum.

Hóast privatu miðlarnir ikki ynskja, at Kringvarpið skal vinna pening við at senda sjónvarpslýsingar, so meta eitt nú Føroya Blaðútgevarafelag og Miðlahúsið, at neyðugt er við sjónvarpslýsingum í Føroyum. Tað tykist vera undirtøka fyri at varðveita sjónvarpslýsingar í sjónvarpinum, men privatir miðlar ynskja, at peningurin

ikki fer til Kringvarpið. Kappingarráðið vísir eisini á, at sjónvarpslýsingar eru serligar í Føroyum, tí eingin annar er at bjóða ein pall til nógvar hyggjarar. Á útvarpsøkinum er støðan ein onnur – hóast vit ikki við vissu vita, hvussu nógv lurta eftir kappingarneytunum hjá Kringvarpinum.

Um lýsingainntøkurnar hjá sjónvarpinum verða settar í ein *miðlagrunn*, óheftan av Kringvarpinum, slepst undan, at Kringvarpið óneyðugt kappast við handilsligar miðlar um lýsingainntøkur, og Kringvarpið fær ikki beinleiðis samband við handilslýsingar í sjónvarpinum. Ein háttur at skipa henda grunn er við at geva privatum og almennum miðlum møguleika at søkja úr grunninum, so fígging kann fáast til partar av útreiðslunum til nýggjar redaktionellar ætlanir ella størri journalistiskt *research*-arbeiði til eitt nú greinir, sendingar, tænastur á netinum og til rakstur.

Fyri at tryggja, at peningurin í grunninum verður latin átøkum, sum stuðla upp undir góðan fjølmiðlasið og geva samfelagnum og borgarunum eitt meirvirði, kann krav setast um, at umsøkjarin skal rættvísgera stuðulin við at vísa til eitt serligt *public service-virði*. Miðlahúsið vísir á, at tey eitt nú kundu sett meira orku av og ment miðlaredaktiónir í Klaksvík og Runavík, um til bar at søkja úr einum miðlagrunni.

Fer peningurin frá sjónvarpslýsingunum í ein *miðlagrunn*, ber framhaldandi til hjá fyritøkum at lýsa í sjónvarpsmiðlinum og fyritøkur, ið arbeiða við sjónvarpslýsingum, fáa inntøkur til at menna sjónvarpslýsingina sum mentanarfyribrigdi.

Sleppur Kringvarpið at lýsa, kann tað gerast torført hjá øðrum sjónvarpsrásum at byrja virksemi, tí pallurin hjá Kringvarpinum er áhugaverdari. Hinvegin er einki, ið forðar nýggjum rásum at varpa lýsingar, sum fyrst og fremst eru gjørdar til hyggjararnar í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum. Hesar lýsingar vórðu ikki framleiddar, um Kringvarpinum var bannað at lýsa, tí kostnaðurin fyri framleiðsluna hevði ikki staðið mát við inntøkugrundarlagið frá rásum við fáum hyggjarum.

Eftir stendur kortini spurningurin, um tað er rætt, at lýsingar eru í einum public service-miðli. Hóast Kringvarpið ikki verður nær tengt at handilsligum áhugamálum,

er so rætt at varpa lýsingar í eini public service-rás? Føroysk Miðlafólk hava víst á, at public service er til fyri fólkið og ikki lýsingavinnuna. Føroysk Miðlafólk eru í útgangsstøðinum ikki fyri, at Kringvarpið lýsir, tí hetta er í andsøgn við grundleggjandi tankan um, at ein public service-stovnur skal vera óheftur. Samstundis grundgeva summi starvsfólk í Kringvarpinum fyri, at lýsingar eisini eru public service. Spurningurin er, um tað er public service, at borgarin hevur møguleika at síggja, hoyra og lesa um tilboð frá vinnulívinum. Ein fullfíggjað public service-støð er einans fíggjað við kringvarpsgjaldi. Men tað er bara ein minniluti av øllum public service-støðum í Evropa, ið nýta henda leist. BBC er fyrimyndin, men hevur kortini inntøkur av handilsligum virksemi uttan fyri Bretland. Hyggjast má altíð eftir viðurskiftunum í einstøku londunum. Í Føroyum er bara ein grundfest sjónvarpsrás og ein stór útvarpsrás. Tí ber til at verja eina skipan, har Kringvarpið verður nýtt sum lýsingapallur. Men verður hugt eftir lýsingum við "reinum" public service-brillum, skal stovnurin ikki fíggjast partvíst við lýsingum. Eingin veit við vissu, hvat hendir við lýsingainntøkunum hjá Kringvarpinum, um bannað verður at lýsa í Kringvarpinum. Partur av upphæddini fer til hinar miðlarnar, men tað er ikki vist, hvussu stórur partur. Største ivamálið við miðlagrunninum er, hvat hendir við privatu miðlunum, um Kringvarpinum framhaldandi verður heimilað at lýsa?

Ein annar ósvaraður spurningur er, um borgararnir, tá í saman um kemur, ynskja lýsingar í Kringvarpinum.

Hyggja vit eftir øllum Kringvarpinum sum lýsingamiðil, so meta nógvar fyritøkur, at Kringvarpið er eitt skilagott stað at røkka brúkarunum. Kringvarpið hevur bæði nógvar lurtarar og hyggjarar. Tað, at nógv velja at lýsa í Kringvarpinum, merkir, at lýsararnir meta, at teir fáa mest fyri peningin við at nýta miðlapallarnar hjá Kringvarpinum. Fyri at geva grunninum so nógvan pening sum gjørligt, uttan at veita eyka almennan stuðul er ein møguleiki, at Kringvarpið eisini sleppur at lýsa í útvarpinum – og møguliga eisini á netinum. Øll peningaupphæddin fer síðani í *miðlagrunnin*. Í øðrum londum, har public service-miðlar eru partvíst fíggjaðir við lýsingainntøkum, er í lóggávuni sett mark fyri, hvussu nógvir minuttir um tíman kunnu nýtast til lýsingar. Hetta kundi eisini verið skilagott at gjørt í Føroyum.

Verður miðlagrunnurin veruleiki, er umráðandi at hugsa um, um rættvísast er, at tær fyritøkur og teir persónar, ið fáa játtaðan pening úr grunninum, skulu bindast til at framleiða tilfar til Kringvarpið, ella um peningurin eisini kann nýtast til innihald í øðrum miðlum. Arbeiðsbólkurin metir, at rættast er at peningurin eisini kann brúkast uttan fyri økið hjá Kringvarpinum. Grunnurin kann eisini skapa áhuga hjá øðrum miðlum fyri framleiðslu av public service-innihaldi.

Hyggja vit eftir *miðlagrunninum*, og hvussu hann er skipaður, er ein møguleiki at lata Mentanargrunni Landsins upp í hendi at umsita grunnin. Fyri at geva grunninum betri yrkisliga barlast kann t.d. partur av nevndini fyri Mentanargrunn Landsins verða mannaður við fólki innan miðlaheimin. Til hetta krevst lógarbroyting í løgtingslóg fyri Mentanargrunn Landsins. Verður hesin leistur valdur, sparir grunnurin pening í umsiting, og størri partur fer til framleiðslu av miðlainnihaldi. Fyri ikki at taka ávísar miðlar framum aðrar, er ein møguleiki at gera ein býtislykil, ið tilskilar metingarstøðið. Hvussu býtislykilin sær út, verður ásett í reglugerð. Býtislykilin kann eisini gerast á ein hátt, at neyðugt ikki er við umsókn, tí peningurin verður latin eftir ávísum metingarstøði. Niðanfyri eru dømi um yvirskipað krøv, ið kundu verið sett til grunnin og játtanir úr honum:

- Framleidda miðlatilfarið skal vera á føroyskum
- Í mesta lagi 50% av upphæddini í grunninum kann fara til Kringvarpið
- Í minsta lagi 25% av upphæddini í grunninum fer til bløðini
- 50% av samlaðu útreiðslunum til ávísa verkætlan skal fíggjast av umsøkjaranum
- Miðlatilfarið skal almannakunngerast í seinasta lagi 12 mánaðir aftaná, játtanin er givin.
- Roknskapur skal fyriliggja

Ein annar spurningur, ið er viðkomandi at svara, er, hvørji kunnu søkja pening úr grunninum. Kunnu øll søkja um pening? Ella skulu fólk umboða eina redaktión? Um

øll kunnu søkja uttan tilsøgn um, at tilfarið verður givið út ella varpað, so kann peningurin í ringasta føri fara fyri skeyti, um eingin redaktión hevur áhuga í at bera miðlainnihaldið víðari. Tískil er skilabest, um einstakir persónar hava gjørt avtalu við redaktión, áðrenn peningur verður latin eini umsókn. Redaktiónir kunnu eisini søkja um pening.

Fyri at tryggja, at verkætlanir ikki verða bundnar at fastari upphædd úr grunninum, er skilabest, um stuðulin til ávís framtøk er tíðaravmarkaður.

Og so er spurningurin, hvussu nágreiniliga arbeiðið skal lýsast í eini umsókn. Um vit siga, at eitt tíðindafólk hevur illgruna um, at okkurt ólógligt fer fram eitt nú í eini fyritøku ella í miðfyrisitingini, fer viðkomandi so í eini umsókn at lýsa viðurskiftini, sum vísa á skeivleikarnar? Væntandi ikki.

# 6 Føroyskir miðlar í framtíðini

Tað er trupult at siga nakað um, hvussu framtíðar miðlamarknaðurin sær út í Føroyum. Tó ber til at siga við vissu, at talgilda gongdin heldur fram, og at serliga fartelefonin verður inngongdin til alsamt størri part av miðlanýtsluni hjá brúkarunum. Tá framtíðar menningin á miðlamarknaðinum skal greinast, spæla stórar altjóða miðlafyritøkur eisini ein týðandi leiklut í, hvussu føroyskir miðlar fara at standa seg. Lýsingainntøkurnar fara í alt størri mun út um landoddarnar. Hetta merkir, at føroysku miðlarnir missa inntøkur, sum annars høvdu farið til framleiðslu av føroyskum tilfari. Hóast rákið ikki er so sjónligt í Føroyum enn, so eru aljtóða fyritøkur sum Google og Facebook við til at minka um inntøkurnar hjá miðlunum. Google og Facebook hava skapt sær eina marknaðarstøðu, sum ger, at fyritøkurnar eru ómissandi hjá lýsarum. Hetta hevur fingið public service-støðir, ið eru fíggjaðar eftir sama leisti sum í Føroyum, at grundgeva fyri, at privatir miðlar ikki skulu berjast innanhýsis í londunum um lýsingainntøkur, men áttu miðlarnir í staðin at samstarvað og kappast ímóti teimum, ið veruliga hótta lýsingainntøkurnar, og hetta eru stórar altjóða fyritøkur á netinum. Netmiðilin gevur útlendskum fyritøkum ein pall at vinna pening frá føroyskum lýsarum. Verður ein *miðlagrunnur* settur á stovn, kann hann eisini byrgja upp fyri, at lýsingainntøkurnar í framtíðini fara til stórar útlendskar fyritøkur, ið ikki nýta lýsingapeningin á føroyska marknaðinum. Netið hevur millum annað tann fyrimun, at tað er samvirkið, og er ofta fyrst við tíðindum. Haraftrat er lættari at skráseta miðlanýtsluna hjá fólki á netinum, ið væntandi fer at geva fyritøkum enn fleiri møguleikar at selja tænastur og vørur til ávísar bólkar í samfelagnum.

Vit vita rættiliga lítið um føroysku miðlanýtsluna, tí hvørki vísindalig hagtøl ella kvalitativar kanningar eru tøkar. Kringvarpið og aðrar miðlafyritøkur hava gjørt einstakar kanningar, men tær eru fáar í tali og kunnu einsamallar ikki metast at vera eftirfarandi fyri samlaðu miðlanýtsluna hjá føroyingum. Í øðrum londum eru tað serliga privatir miðlar, ið hava skipað so í bandi, at til ber at siga við vissu, nær og hvørji fólk hyggja ella lurta eftir ávísum sendingum, og hvussu nógv lurta. Á henda hátt ber til hjá miðlunum at selja vitanina um brúkararnar víðari til fyritøkur, ið á

tann hátt fáa innlit í, hvar mest fæst fyri peningin til lýsingar. Lítið bendir samstundis á, at mátingartól verða nýtt í Føroyum komandi árini. Hetta ger alnetið til ein ógvuliga áhugaverdan miðil hjá fyritøkum at lýsa í, tí prísurin fyri at savna inn vitan um brúkararnar av ávísum netsíðum er lítil, og nógv fólk eru virkin á alnetinum. Tískil hava lýsarar við alnetinum og ikki minst sosialum netverkum fingið ein stóran møguleika at fáa nógv størri innlit í, hvørjir føroyingar nýta ávísar netsíður, og hvørji áhugamál bólkarnir hava. Henda sannroynd ger, at í framtíðini fer ein størri partur av samlaðu lýsingakrónunum hjá fyritøkum at verða nýttar á alnetinum og ikki í eldri miðlum.

Ein miðal brúkari av Facebook í Føroyum er á síðuni hvønn dag og fær størri og størri atgongd til Facebook umvegis eina smartphone og ikki eina teldu. Síðan verður brúkt til sosial endamál, netverk og at deila innihald á netinum – alt frá Youtube brotum til tíðindi.

Eitt annað rák, sum hevur tikið seg nógv fram, og sum verður størri í framtíðini, er ein sundurbýtt miðlanýtsla. Alnetið, smartphones og nógvar sjónvarpsrásir gera, at føroyingar hava fleiri valmøguleikar enn nakrantíð áður, tá teir skulu kunnast, undirhaldast ella nema sær vitan. Í hesum miðlaveruleika kann eitt sterkt føroyskt miðlaútboð tryggja eina føroyska rødd í einum alsamt meira altjóðagjørdum miðlaheimi, har útlendskir miðlar hava stóra útbreiðslu. Føroyskir miðlar kunnu, øvugt av útlendskum miðlum, siga føroyingum søgur um føroysk viðurskifti við føroyskum eygum. Tí er ein av stóru avbjóðingunum at tryggja grundarlagið hjá privatu miðlunum og tryggja Kringvarpið soleiðis, at stovnurin megnar at geva føroyingum eitt felags útgangsstøði í eini alsamt meira einstaklingsbundnari og sundurbýttari miðlanýtslu.

Tøkniligar broytingar fara væntandi eisini at geva sjónvarpshyggjarunum størri frælsi at síggja sjónvarpssendingar, tá teimum lystir, og ikki einans tá sendingarnar verða vístar á sjónvarpsrásum. Við eitt nú Apple TV ber til at keypa og síggja sjónvarp *on demand* – altso, hyggjarin ger sjálvur av, nær innihaldið verður nýtt. Hetta merkir, at vælumtóktar sendirøðir síggjast í somu løtu, tær vera sendar fyrstu ferð. Hyggjarin

hevur sostatt møguleikan at síggja nærum alt útlendskt tilfar, áðrenn tað verður víst á eitt nú public service-rásum í Evropa.

Hyggja vit eftir umstøðum, sum ikki eru tengdar at fíggjarligum viðurskiftum, men sum ávirka føroyskar miðlar, hevur tað stóran týdning fyri føroysku miðlamentanina, um Fróðskaparsetrið fer at bjóða út útbúgving í miðlafrøði í 2012. Longu í 2001 hevði Fróðskaparsetrið ætlanir um at bjóða út útbúgving í miðlafrøði. Verða ætlanirnar nú veruleiki, fer tað væntandi at styrkja um førleikarnar í føroyskum miðlum – bæði á tíðindaøkinum og málsliga. Umframt hetta fer eitt slíkt útbúgvingartilboð á Fróðskaparsetrinum eisini at hava við sær, at tað í framtíðini verður granskað meira í føroyskum miðlaspurningum. Væntandi fer hetta eisini at elva til, at størri partur av starvsfólkunum í miðlunum hava útbúgving. Útbúgvingarstøðið í føroysku miðlunum er ikki serliga høgt samanborið við onnur vesturlendsk lond. Í Bretlandi hava eitt nú 98% av tíðindafólkunum útbúgving. Haraftrat kann hetta eisini styrkja serlig vitanarøki hjá tíðindafólkunum, so summi tíðindafólk fáa serligar førleikar at viðgera og miðla ávís viðurskifti. Lesandi kunnu seta saman fak á ein hátt, at tey nema sær serliga vitan um eitt nú búskap, løgfrøði, fiskivinnu, mál og mentan, ið kann leggjast aftrat útbúgvingini í miðlafrøði.

# 7 Tilmæli frá arbeiðsbólkinum

Við útgangsstøði í viðgerðini av føroyskum miðlum omanfyri, setir arbeiðsbólkurin fram síni tilmæli. Fyrst verða viðurskifti, ið arbeiðsbólkurin heldur skulu broytast ella ikki broytast, løgd fram. Síðani setir arbeiðsbólkurin fram 4 uppskot, ið geva føroyingum betri miðlar í framtíðini.

Arbeiðsbólkurin er av teirri fatan, at atlit at fólkaræði og margfeldi skulu viga tyngst, tá ið politiska skipanin skapar karmarnar, sum miðlarnir skulu virka undir. Vinnufremjandi atlit eru tískil ikki týdningarmesta barometrið, tá lóggávan á økinum verður smíðað. Hetta merkir, at fyrilit fyrst og fremst skulu takast fyri, hvønn tørv fólkið og samfelagið hevur, og ikki so nógv hvønn tørv fyritøkur og stovnar hava.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at

- Kringvarpið skal vera verandi ein sjálvstøðugur almennur stovnur
- Kringvarpsgjaldið verður lagt inn í skattaskipanina sum fast gjald
- Fasta gjaldið verður prístalsviðgjørt
- Lýsingainntøkurnar hjá Kringvarpinum fara í ein *miðlagrunn*
- Miðlagrunnurin stuðlar føroysku miðlunum
- Kringvarpsgjaldið verður MVG-frítikið
- Sjónvarpsrásin hjá Kringvarpinum verður talgildað

Við støði í útgreiningini av Kringvarpinum sum alment partafelag metir arbeiðsbólkurin ikki, at hetta er eina skilagóða loysn. Hetta hevði givið privatu miðlunum enn størri kapping á lýsingamarknaðinum umframt, at trúvirðið hjá Kringvarpinum ikki hevði verið tað sama, um lýsingar fíggjaðu virksemið.

Verður kringvarpsgjaldið lagt inn í skattaskipanina sum fast gjald fyri allar borgarar yvir 18 ár, varðveitir Kringvarpið frástøðuna til politisku skipanini – hóast tað almenna krevur gjaldið inn. Borgararnir sleppa undan at rinda gjaldið til Kringvarpið við girokorti, og Kringvarpið sparir pening í umsiting. Haraftrat tryggjar skipanin, at

øll rinda kringvarpsgjald og ikki sum í dag, har nógv ikki rinda. Skal progressivitetur inn í gjaldið, má politiska skipanin taka støðu til tann spurningin. Eitt fast mánaðarligt gjald ger, at stakir uppihaldarar sleppa bíligari. Hinvegin rinda húski við fleiri enn tveimum persónum yvir 18 ár meira enn í dag. Arbeiðsbólkurin metir, at verður gjaldið lagt inn í skattaskipanina sum fast gjald, er tað av alstórum týdningi, at Kringvarpið verður framhaldandi tryggjað meginregluna um armslongd. Hetta merkir, at velur Løgtingið at broyta fíggingarháttin hjá Kringvarpinum í framtíðini, so skal vendast aftur til verandi kringvarpsgjald, so Kringvarpið ikki kemur á fíggjarlógini. Fyri at tryggja Kringvarpinum fasta inntøku, er eisini umráðandi at gera langar avtalur um fasta gjaldið, so ikki ber til at broyta upphæddina frá ári til ár.

Fyri at geva Kringvarpinum betri fíggjarligt støðufesti mælir arbeiðsbólkurin til, at fasta gjaldið verður prístalsviðgjørt. Hetta gevur stovninum betri arbeiðsumstøður og er í tráð við meginregluna um armslongd, tí politiska skipanin skal ikki viðgera gjaldið, hvørja ferð tað skal javnast. Hetta tryggjar samstundis, at inntøkurnar hjá stovninum fylgja búskapargongdini í samfelagnum, so at Kringvarpið ikki stendur í somu støðu sum í dag um nøkur ár við verri keypiorku.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Kringvarpið varðveitir lýsingapallin í bæði útvarpi og sjónvarpi, og at peningurin fer í ein *miðlagrunn*, ið hevur til endamáls at styrkja miðlatilboðið í Føroyum. Allir miðlar kunnu søkja úr grunninum til endamál, ið fremja betri miðlainnihald. Til ber ikki við vissu at siga, hvørja ávirkan skipanin fær á privatu miðlarnar. Spurningurin er, um privatu miðlarnir missa enn fleiri pengar, ella um peningurin úr grunninum gevur teimum størri fíggjarliga orku.

Miðlagrunnurin hevur til endamáls at stuðla føroysku miðlunum. Bæði privatu miðlarnir og Kringvarpið hava tørv á peningi til framleiðslu av góðum og álítandi innihaldi. Henda tørv kann miðlagrunnurin í ávísan mun nøkta.

Arbeiðsbólkurin metir, at rættast er, at kringvarpsgjaldið verður MVG-frítikið, og at gjaldið hækkar samsvarandi, soleiðis at borgarin rindar somu upphædd sum í dag. Hetta kann vera ein góð teknisk loys, um eitt politiskt ynski er um at uppraðfesta

Kringvarpið. Í dag rinda fólk beinleiðis til Kringvarpið. Hetta er ein upphædd, ið Kringvarpið fær. Samstundis skal Kringvarpið lata 25% av hesi upphædd aftur til landskassan, ið er MVG. Hetta er eisini at gera óneyðugan mun á skrivaða og talaða orðinum. Í dag eru bøkur og dagbløð MVG-frítikin. Umframt at geva Kringvarpinum einar 10 mió. kr. í meirinntøkum, rindar fólkið ikki meira í kringvarpsgjaldi, um tað verður MVG-frítikið. Hinvegin merkir hetta, at landskassin missir pening. Hvussu peningurin skal finnast, er ein politisk raðfesting, sum støða ikki er tikin til. Hyggja vit eftir skandinavisku londunum, rindar borgarin MVG av kringvarpsgjaldinum í Danmark. Hinvegin er einki MVG á kringvarpsgjøldunum í Norra og Svøríki.

Í samstarvi við Føroya Tele ber til at talgilda sjónvarpsrásina hjá Kringvarpinum, so allir føroyingar fáa talgilda atgongd til sendingarnar. Stórur partur av føroyingum hava longu atgongd til nógvar av sendingunum, sum Kringvarpið sendir, men sum stovnurin ikki hevur framleitt ella viðgjørt málsliga. Arbeiðsbólkurin metir, at skilagott er, at Kringvarpið byrjar at samanseta eina føroyska sendiskrá burturav – hóast hon fyrstu árini væntandi ikki verður umfatandi. Við tíðini kann Kringvarpið menna eina sjálvstøðuga føroyska sjónvarpsrás, ið gevur føroyingum eitt betri føroyskt sjónvarpstilboð.

Niðanfyri eru 4 uppskot, ið arbeiðsbólkurin metir, geva miðlunum betri livikor og fólkinum betri innihald og miðlaútboð.

*Uppskot 1:*

Kringvarpsgjaldið verður MVG-frítikið. Hetta gevur Kringvarpinum umleið 10 mió. kr. í meirinntøkum um árið. Kringvarpið verður goldið við føstum gjaldi yvir skattaskipanina og varðveitir rættin at varpa lýsingar. Fasta gjaldið verður prístalsviðgjørt. Peningurin frá lýsingainntøkum verður settur í ein *miðlagrunn* undir Mentamálaráðnum, ið hevur til endamáls at geva føroyingum betri miðlainnihald.

| | mió. kr. |
|---|---|
| Inntøkur:<br>MVG-frítøka<br>Lýsingar í Miðlagrunnin<br>Aftur úr Miðlagrunninum | <br>10<br>-6<br>3 |
| Útreiðslur:<br>Innkrevjing av kringvarpsgjaldinum | <br>0,5 |
| **Samlað broyting í fíggjarætlan KVFs** | **7,5** |

*Uppskot 2:*

Kringvarpið verður goldið við føstum gjaldi yvir skattaskipanina og varðveitir rættin at varpa lýsingar. Fasta gjaldið verður prístalsviðgjørt. Peningurin frá lýsingainntøkum verður settur í ein *miðlagrunn* undir Mentamálaráðnum, ið hevur til endamáls at geva føroyingunum betri miðlainnihald. Vigað verður upp ímóti vantandi lýsingainntøkunum hjá Kringvarpinum við at hækka mánaðarliga gjaldið eftir leistinum í talvu 3, so gjaldið verður áleið 155 kr/mð fyri hvønn persón yvir 18 ár - svarandi til uml. 3720 kr/ár fyri eitt húski við 2 persónum.

| | mió. kr. |
|---|---|
| Inntøkur:<br>Økt kringvarpsgjald<br>Lýsingar í Miðlagrunnin<br>Aftur úr Miðlagrunninum | <br>6<br>-6<br>3 |
| Útreiðslur:<br>Innkrevjing av kringvarpsgjaldinum | <br>0,5 |
| **Samlað broyting í fíggjarætlan KVFs** | **3,5** |

*Uppskot 3:*

Kringvarpið verður goldið við føstum gjaldi yvir skattaskipanina og varðveitir rættin at varpa lýsingar. Fasta gjaldið verður prístalsviðgjørt. Kringvarpsgjaldið verður hækkað soleiðis, at Kringvarpið hevur somu inntøkur sum í dag. Gjaldið verður eftir leistinum í talvu 3 góðar 145 kr/mð fyri hvønn persón yvir 18 ár - svarandi til uml. 3480 kr/ár fyri eitt húski við 2 persónum. Peningurin frá lýsingainntøkum verður settir í ein *miðlagrunn* undir Mentamálaráðnum, ið hevur til endamáls at geva føroyingum betri miðlainnihald.

| | mió. kr. |
|---|---|
| Inntøkur: | |
| Økt kringvarpsgjald | 2,5 |
| Lýsingar í Miðlagrunnin | -6 |
| Aftur úr Miðlagrunninum | 3 |
| Útreiðslur: | |
| Innkrevjing av kringvarpsgjaldinum | 0,5 |
| **Samlað broyting í fíggjarætlan KVFs** | **0** |

*Uppskot 4:*

Kringvarpið missir rættin at varpa handilslýsingar. Kringvarpsgjaldið verður MVG-frítikið. MVG-frítøkan gevur Kringvarpinum umleið 10 mió. kr. í meirinntøkum um árið. Kringvarpið verður goldið við føstum gjaldi yvir skattaskipanina. Fasta gjaldið verður prístalsviðgjørt. Gjaldið verður eftir leistinum í talvu 3 umleið 145 kr/mð fyri hvønn persón yvir 18 ár - svarandi til uml. 3480 kr/ár fyri eitt húski við 2 persónum.

| | mió. kr. |
|---|---|
| Inntøkur: | |
| MVG-frítøka | 10 |
| Ongar lýsingar | -6 |
| Útreiðslur: | |
| Innkrevjing av kringvarpsgjaldinum | 0,5 |
| **Samlað broyting í fíggjarætlan KVFs** | **4,5** |

## 8 Útgangur

Óheftir og neyvir miðlar eru grundvøllurin undir vælvirkandi fólkaræðum. Hesa uppgávu megna privatu miðlarnir partvíst at røkja. Men sum álitið hevur víst á, er ein óheftur public service-stovnur avgerandi fyri samlaðu miðlamyndina. Ein sjálvstøðugur almennur public service-stovnur gevur fólkinum og samfelagnum neyðugu amboðini til at virka í einum nútímans fólkaræði. Tí er alneyðugt at samfelagið tryggjar miðlunum lív og rúm. Miðlarnir skapa eitt opið orðaskifti og stimbra eina kritiska samfelagsliga fatan og ikki minst kritiska samfelagsliga sjálvsfatan.

Uppskotini hjá arbeiðsbólkinum tryggja miðlunum betri karmar, men Kringvarpið fer kortini framhaldandi at merkja sveiggj í inntøkunum, tí spæliinntøkurnar eru óstøðugar. Fíggjarligu umstøðurnar hjá Kringvarpinum verða kortini betri eins og fíggjarliga støðufestið.

Tað er av altavgerandi týdningi, at tey politisku ábyrgdarhavandi ger sær greitt, hvussu tey ynskir, at public service í Føroyum skal skipast. Arbeiðsbólkurin hevur í tilmælinum víst á og mælir til, at fíggjarliga grundarlagið undir Kringvarpinum verður styrkt, so fólkið í framtíðini fær eitt betri føroyskt miðlatilboð. Útboðið av útlendskum tilfari er ovurhonds stórt, og tá analoga sjónvarpssendinetið verður sløkt, er tørvur á peningi til framleiðslu av føroyskum tilfari til sjónvarpsrásina hjá Kringvarpinum. Føroyingar eru sjónvarpshyggjarar fleiri tímar av sjónvarpi, men tilfarið er ikki alt føroyskt, og tí er stóra avbjóðingin at kappast við útlendska tilfarið. Fyri at geva Kringvarpinum góðar kappingarfyritreytir, skal Kringvarpið hava støðugt fíggjarligt grundarlag.

Fíggjarliga grundarlagið hjá miðlunum er avgerandi fyri, hvør nøgdin og góðskan av føroyska innihaldinum er. Og tað kostar meira at gera tilfarið, tá fólkagrundarlagið er lítið. Hesa sannroynd heldur arbeiðsbólkurin, at politiska skipanin má góðtaka. Public service í Føroyum fer altíð at kosta munandi meira enn í øðrum fjølmentari samfeløgum. Fær Kringvarpið størri fíggjarligt rásarúm, verður framleiðslan av tilfari

økt, og føroyski stovnurin stendur sterkari í hørðu kappingini við útlendsku miðlarnar. Útvarpið hjá Kringvarpinum hevði t.d. gjørt fleiri, betri og meiri viðkomandi sendingar um føroysk og altjóða viðurskifti sæð við føroyskum eygum.

Vegna okkara serstøðu sum lítið, fólkafátækt - og í nógvum førum viðkvæmt samfelag - er tað neyðugt at gjalda meira fyri public service enn onnur lond gera. Tað er neyðugt, tí public service-stovnurin tryggjar samfelagnum og øllum samfelagsbólkum innlit og kunning um yvirskipað og ítøkilig viðurskifti um alt samfelagið; um allar fólkaræðisligar spælireglur; tryggjar øllum meirilutum kunnleika um allar minnilutar og øllum minnilutum kunnleika um allar meirilutar. Hetta eru viðurskifti, ið eru serliga neyðug at byggja upp og verja í mentanarliga og málsliga smáum økjum.

Kringvarpið skal bæði gera sendingar, ið venda sær til allar føroyingar og samstundis smalar sendingar til ávísar málbólkar í samfelagnum. Kringvarpið skal savna føroyingar í stórar og smáar felagsskapir, og tað er av stórum týdningi, hvat føroyingar savnast um. Arbeiðsbólkurin heldur, at hetta gerst best við einari óheftari public service-skipan. Hetta krevur, at Kringvarpið verður fíggjarliga raðfest av politisku skipanini, og at gjaldið, sum fer inn í skattaskipanina, verður prístalsviðgjørt. Verður hetta ikki veruleiki, stendur Kringvarpið um nøkur ár aftur í somu støðu, sum tað ger í dag. Hetta hevur fyrst og fremst avleiðingar fyri borgararnar. Teir fáa eitt avmarkað og verri miðlatilboð, um gjaldið ikki fylgir prísgongdini í samfelagnum.

Uppskotini hjá arbeiðsbólkinum tryggja eisini privatu miðlunum betri kor. Kringvarpið fær ikki beinleiðs lýsingainntøkur, og miðlagrunnurin gevur privatum miðlum atgongd til eyka fíggjarmegi, ið gevur føroyingum betri miðlar í framtíðini. Verandi støða er hvørki góð ella haldbar – hvørki fyri privatu miðlarnar ella Kringvarpið. Úrslitið er, at borgararnir hava eitt ov avmarkað miðlaútboð. Eitt sterkt føroyskt miðlaútboð hevði hinvegin givið fólkaræðinum, málinum og einstaka borgaranum eitt virði, ið hesi ikki kunnu vera fyriuttan. Samfelagið hevur ábyrgd av at tryggja góðar miðlar, tí miðlarnir eru ein grundsúla í framkomnum fólkaræðum.

# 9 Yvirlit yvir hoyringarpartar

- Kringvarp Føroya
- Kringvarpsstýrið
- Føroysk Miðlafólk
- Føroya Blaðútgevarafelag
- Samskifti
- Kappingarráðið
- Miðlahúsið
- Iktus
- 10‘arin
- R2 Net
- Starvsmannafelagið

13. apríl 2011 hevði arbeiðsbólkurin fund við Dansk Bladudgiverforening, sum hevði ein av sínum fundum í Havnini.

12. mai 2011 skipaði Mentamálaráðið saman við Norðurlandahúsinum fyri almennum fundi í Norðurlandahúsinum, har fyrrverandi svenski mentamálaráðharrin, Bengt Gjöransson, helt fyrilestur um ”Miðlar í fólksins tænastu”.

## Keldur

*Avmarkaður Marknaður, 1996.* Tórshavn

Álit um grønlendskar miðlar "Stærke medier – vi skaber fremtiden sammen", 2010

Baker, C. E., 2007. *Media Concentration and Democracy: Why Ownership Matters.* New York: Cambridge University Press.

Curran, J., Lyengar, S., Lund, A.B. og Salovaara-Moring, I., 2009. "Media system, public knowledge and democracy: a comparative study", European Journal of Communication, 24 (1): 5-26

Dwyer, T., 2010. *Media Convergence.* Berkshire: Open University Press

Gallup Føroyar, gallup.fo

Hagstova Føroya, hagstova.fo

Lowe, F. G. & Nissen, S.N., 2011. *Small Among Giants: Television Broadcasting in Smaller Countries.* Göteborg: Nordicom.

Lund, A. B., Nord, L., Roppen, J., 2009. *Nye udfordringer for gamle medier: skandinavisk public service i det 21. århundrede.* Göteborg: Nordicom

Lund, A. B., Willing, I., Ørsten, M. B., 2009. *Hvor kommer nyhederne fra?: Den journalistiske fødekæde i Danmark før og nu.* Århus: Forlaget Ajour.

Løgtingslóg nr. 22 frá 20. februar 1998 um kringvarp v.m.

McQuail, D., 2010. *Mass Communication Theory (6th ed).* London: Sage

Moring, T. & Godenhjelm, S., 2011. Broadcasting for Minorities in Big and Small Countries. Í, Lowe, F. G. & Nissen, S.N., 2011. *Small Among Giants: Television Broadcasting in Smaller Countries.* Göteborg: Nordicom, s. 179-202

Public service sáttmáli millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið, 2010

Resultatkontrakt mellem KNR og Naalakkersiumut for årene 2009 til og med 2012